# FÓTBÓLTUR KAPPINGARÁRIÐ 2024

**FSF** FÓTBÓLTSBLAÐIÐ

Hetta blað er ***ókeypis!***



#SAMAN**FRAMÁ**



# UEFA NATIONS LEAGUE™

DEILD C BÓLKUR 4 **HEIMA**DYSTIR **2024**

# FØROYAR

## NORÐURMAKEDÓNIA
7. SEPTEMBUR 2024 KL.14:00

## ARMENIA
10. OKTOBUR 2024 KL.19:45

## LETTLAND
13. OKTOBUR 2024 KL.19:45

**TÓRSVØLLUR** STADION

KEYP ATGONGUMERKI Á **FSF.FO**

# Føroyskur fótbóltur er einki uttan grasrøturnar



**Christian F. Andreasen**
*FSF-forseti*

*So stendur enn eitt kappingarár fyri framman, við stórum og spennandi avbjóðingum. Fótbóltsárið í fjør gjørdist hendingaríkt, og tað er lítið og einki, ið bendir á, at 2024 verður øðrvísi – heldur tvørtur ímóti*

Fyri fyrstu ferð megnaði eitt føroyskt lið at spæla seg í eitt evropeiskt bólkaspæl, og endiliga fingu vit møguleikan at uppliva hesar dystir á heimavølli. Samstundis er tað mín vón, at framyvir skulu stóru evropeisku feløgini venja seg við, at tey nú skulu til Føroyar at spæla týðandi dystir, har mál og stig nú standa upp á spæl.

Men føroyskur fótbóltur er einki uttan grasrøturnar. Tey, ið dag og dagliga, á degi sum á kvøldi, eru tøk at veita eina hjálpandi hond, so føroyskur fótbóltur alla tíðina er í menning. Tað er tískil sera týdningarmikið, at vit minnast til at hjúkla um tey, ið hjúkla um føroyskan fótbólt.

Tí tað er ikki ein sjálvfylgja, at venjarar, foreldur, børn og vaksin, og mong onnur bera so í bandi, at tey, ið vilja og ynskja fótbóltin, hava eitt tilboð, ið er nøktandi.

Fótbólturin er nevniliga í harðari kapping við aðrar ítróttargreinar, sum eisini gera eitt stórt arbeiði fyri teirra limir. Tí hava vit, ið varða av fótbóltinum, eina ábyrgd, sum vit ongantíð mugu undirmeta, ella taka fyri givið. Heldur skulu vit í felag alla tíðina vera til reiðar at bretta upp um armar, og arbeiða harðari, føroyskum fótbólti at frama.

Nógv spennandi er á skránni í 2024. Landskappingarnar fara av bakkastokki í næstum, og um fáar vikur verða fyrstu steypadystirnir spældir. Harafturat skulu okkara landslið aftur í ár royna seg í nógvum dystum og kappingum, sum vit sjálvandi síggja við spenningi fram ímóti.

Men lat okkum alla tíðina minnast til, at fyri ta 11 ára gomlu gentuna, ella tann 13 ára gamla dreingin, hevur tað stóran týdning, at teirra umstøður til venjing og dystir eru á so høgum stigi sum tilber. Tí er ein av okkara fremstu uppgávum at geva teimum ungu eitt tilboð og ein møguleika, ið tey velja og vilja. Tey eru framtíðin, og tað er framtíðina, vit skulu byggja víðari á.

**Við hesum orðum fari eg at ynskja okkum øllum eitt gott kappingarár**



**FSF FÓTBÓLTSBLAÐIÐ 2024**
**Útgevari:** Fótbóltssamband Føroya **Ábyrgd:** Hans Erik Danielsen / FSF
**Tekstur:** Terji Nielsen, Heðin Arge, Niels Petersen, Tróndur Arge, Símun Christian Olsen og Hans Erik Danielsen
**Myndir:** Sverri Egholm, Jens Kristian Vang, Bjarni Enghamar og Hans Erik Danielsen
**Grafiskt snið:** Pætur Eyðunsson Jensen **Prent:** TrykNet



Eitt felag
*vit eiga*
í felag

betri.fo

betri




# Håkan hugsar frameftir

*Landsliðsvenjarin hevur lagt eina harða EM-undankapping aftur um seg, og lítur nú frameftir. Ikki bara ímóti nýggjari Nations League-kapping, men eisini frameftir vøllinum, tí álopsspælið stendur ovast á breddanum hjá landsliðsmonnunum í ár*

Håkan Ericson dylir ikki fyri, hvat stendur ovast á "to-do" listanum hjá bestu føroysku fótbóltsmonnunum í 2024. Landsliðið skal hótta mótstøðumálið meir enn í 2023, sigur sviin, sum hevur fingið sær upp í koppin í høvuðssætinum hjá Fótbóltssambandinum við Tórsvøll. Kaffi við eitt sindur av mjólk í.

Føroyar spældu seg til ov fáar málkjansir í farnu EM-undankappingini og skutu tískil ov fá mál, heldur Håkan Ericson. Mads Boe Mikkelsen legði Føroyar á odda í fyrsta dystinum á útivølli ímóti Moldova, og Odmar Færø javnaði ímóti Albania á Tórsvølli. Meir bleiv tað ikki til í "mál fyri" protokollini, og tað skal broytast í Nations League, men við einum ávísum fyrvarni.

– Tað verður okkara høvuðsavbjóðing. Hvussu varðveita vit okkara góða verjuspæl, samstundis sum vit spæla betri í álopsstøðu, spyr sviin.

> **"Hvussu varðveita vit okkara góða verjuspæl, samstundis sum vit spæla betri í álopsstøðu"**

Tí "mál ímóti" protokollin sær munandi betri út, og ongantíð fyrr hevur føroyska manslandsliðið latið færri mál inn í eini HM- ella EM-undankapping enn tey 13 í fjør. Júst hesum er Håkan Ericson errin av, og tað kann fáa stóran týdning í hesum árinum.

## ALT KANN HENDA

Tá hesi orð verða skrivað, er landsliðsvenjarin júst komin aftur úr franska høvuðsstaðnum, París, har lutakastið til nýggjastu útgávuna av UEFA Nations League hevur verið. Tað er í lutfalsliga nýggju kappingini hjá UEFA, at Håkan Ericson hevur fingið síni bestu úrslit.

Í fyrstu royndini eydnaðist at vinna bólkin í flyta úr D-deildini upp í C-deildina, har Føroyar fingu átta stig í 2022, millum annað við sigri á Turkalandi á Tórsvølli.

Hesaferð komu Armenia, Norðurmakedónia og Lettland úr UEFA-bollanum, og tað er landsliðsvenjarin hvørki fullnøgdur ella ónøgdur við.

– Armenia er kanska eina hyll niðanfyri Svøríki og Rumenia, sum vit eisini kundu fingið. Úr triðja potti fingu vit Norðurmakedónia, har dreymamótstøðuliðið heilt sikkurt var Kýpros, sum hevur havt nøkur trupul ár. Í fjórða styrkisbólki fingu vit so Lettland, sum er á veg uppeftir, ímeðan Estland kanska er á veg øvugtan veg, sigur Håkan Ericson.

Yvirhøvur er ringt at meta um bólkin og útnevna nakran sólarkláran vinnara ella tapara frammanundan.

– Vit trúgva sjálvandi upp á, at vit hava møguleikar í øllum dystunum. Eg meti, at vit eru á sama støði sum Lettland, meðan Armenia og Norðurmakedónia eru á einari hægri hyll. Men samstundis haldi eg, at øll liðini hava møguleika ímóti hvør øðrum í einstøkum dystum. So javnan meti eg hendan bólkin at vera, sigur Håkan Ericson.

Málið er enn sum áður at varðveita plássið í C-deildini, men vit droyma sjálvandi um at koma hægri, greiðir landsliðsvenjarin frá.

## VÆL NØGDUR VIÐ VENJINGARDYSTIRNAR

Nations League verður sum vanligt spælt um heystið, og tí er neyðugt við venjingardystum fyrra hálvárið, sum skulu brúkast til at menna og fínstilla spæliætlanina. Í ár hittir Føroyar Liktinstein, Danmark, Estland og antin Lettland ella Litava í teimum fýra venjingardystunum, sum eru komnir á skránna. Håkan Ericson er væl nøgdur við mótstøðuna, sum hansara menn skulu royna seg ímóti komandi mánaðirnar.

– Hetta er ein góð samanseting. Liktinstein er kanska eitt av teimum fáu londunum, sum vit skulu meta okkum vera betri enn. Tað hava vit víst, tá vit hava spælt síðstu árini. Eg sigi ikki, at tað verður ein lættur dystur, men eg vóni, at vit fáa roynt okkum við álopsspæli. Akkurát øvugt verður tað ímóti Danmark, og við farna árinum í huga eru danskarar kanska ov sterkir at spæla ímóti júst nú, men tað ber illa til at siga nei, tá teir bjóða av. Tað taka vit sum eitt kompliment, onkursvegna. Í Baltic Cup spæla vit ímóti liðum, sum vit møta í Nations League, so tað tykist skilagott. So vit skulu arbeiða hart við álopsspæli ímóti Liktinstein, verjuspælið ímóti Danmark og við báðum hesum í Baltic Cup, áðrenn álvarin byrjar í september, sigur Håkan Ericson.



## Håkan Ericson um:

### ÁLOPSAVBJÓÐINGARNAR

– Tá vit í dystum ella pørtum av dystum hava spælt við fimm í verjuketuni ella við fýra og einum beint frammanfyri, sum kann fella aftur í verjuketuna, er trupult hjá mótstøðuliðunum at spæla seg ígjøgnum. Á venjaraskeiði í Oslo tosaði norski venjarin, Ståle Solbakken um, at norðurlond í stóran mun hava mist tær góðu verjudygdirnar, men nevndi okkum sum dømi upp á tað øvugta. Vit hava jú bygt nóg upp á farnu árini fyri at verja væl, men vit hava ikki ein framherja sum Nicolaescu (Ion, Moldova, red.), sum megnar at skapa støður mestsum einsamallur, og tað er ein avbjóðing. Síðan vildi eg fegin havt ein framherja, sum rann meira djúpt, afturum mótstøðuverjuna.

– Eg haldi framvegis, at Jóan Símun Edmundsson er tann, sum dugir best at taka ímóti og halda upp á bóltin undir trýsti, men hann er ikki ein gjøgnumbrotsspælari, sum kann bjóða av við ferð ímóti tveimum miðverjum frá miðjum vølli og skapa farligar støður. Vit mugu spæla okkum fram eftir upp á ein annan máta. So álopsspælið er treytað av mínum avgerðum og teimum spælaratýpunum, sum vit hava í hópinum.

### EM-UNDANKAPPINGINA Í 2023

– Vit hava verið fyri atfinningum, og tað er ikki óvanligt, tá tú meginpartin av árinum liggur niðast við einum stigi og uttan sigur. Eg skilji, at fólk eru vónsvikin av, at vit bert fáa eitt stig ímóti Moldova. Júst tað, kanst tú siga, miseydnaðist. Samstundis er Moldova eitt land, sum vit altíð hava spælt javnar dystir ímóti. Moldova hevur størri fólkatal og nógv fleiri spælarar, sum spæla í sterkari fótbóltskappingum. So tað er ikki givið, at vit skulu vinna ímóti teimum hvørja ferð. Harafturat haldi eg, at vit hava ikki hepnið við okkum ímóti teimum. Vit eru betur í fyrra hálvleiki í útidystinum, og kundu havt skotið tvey ella trý mál, men fáa bara tað eina. Eftir steðgin fella vit saman, og tað er ikki gott, men ein frágreiðingin er, at spælararnir ikki høvdu spælt stórvegis, tí tvey umfør í Betrideildini vóru útsett fyri veður. Í heimadystinum dominera vit fyrstu 40 minuttirnar, men vit eru óneyvir í avgerandi støðunum, og so verða vit revsaðir, og Moldova skorar upp á skjótt kontra skapt av frálíka framherjanum, Ion Nicolaescu.

– Hinum dystunum eri eg onkursvegna nokkso errin av. Ímoti Kekkia heima eru vit ikki nær við at fáa stig, men vit eru heldur ikki útspældir. Á heimavølli ímóti Albania livir dysturin, til teir skora til 3-1 heilt seint. Vit tapa 2-0 úti og heima ímóti Póllandi, har vit í øðrum dystinum spæla við 10 monnum ein hálvleik. Tað er málleyst til góðir 70 minuttir eru spældir á útivølli ímóti bæði Póllandi og Kekkia, og tá merkja vit, at teir eru trýstir, og áskoðararnir hava hug at finnast at sínum egnu. Í báðum dystunum fáa vit tvey óheppin og óvanlig brotsspørk ímóti okkum. Tað er sjálvandi ikki bara óhepni, at vit bert hava tvey stig, men vit hava ikki júst verið hepnir í tílíkum støðum.

– Eg eri sera væl nøgdur við okkara verjuspæl. Vit spæla eisini málleysan javnleik í Albania, og vóru samstundis einasta lið, sum fekk stig á teirra heimavølli. Um vit suma út, er okkara verjuspæl betri enn nakrantíð fyrr. Bert 13 mál verða skotin ímóti okkum. Hinvegin skapa vit ov lítið frammanfyri mótstøðumálinum.

### A-landsliðið skrá 2024

| | | | |
|---|---|---|---|
| 22. mars | | Føroyar – Liktinstein | Venjingardystur |
| 26. mars | kl. 19:15 | Danmark – Føroyar | Venjingardystur |
| 8. juni | | Estland – Føroyar | Baltic Cup |
| 11. juni | | Finalan / 3.-4. pláss | Baltic Cup |
| 7. septembur | kl. 14:00 | Føroyar – Norðurmakedónia | UEFA Nations League |
| 10. septembur | kl. 19:45 | Lettland – Føroyar | UEFA Nations League |
| 10. oktobur | kl. 19:45 | Føroyar – Armenia | UEFA Nations League |
| 13. oktobur | kl. 19:45 | Føroyar – Lettland | UEFA Nations League |
| 14. novembur | kl. 17:00 | Armenia – Føroyar | UEFA Nations League |
| 17. novembur | kl. 14:00 | Norðurmakedónia – Føroyar | UEFA Nations League |



# MIÐLARNIR TIPPA BETRI DEILDIN 2024



### Jákup Ósá
*bolt.fo*

**Betri Deildin MENN**
1. KÍ
2. VÍKINGUR
3. HB
4. NSÍ
5. B36
6. 07 VESTUR
7. SKÁLA
8. B68
9. EB/STREYMUR
10. ÍF

**Betri Deildin KVINNUR**
1. KÍ
2. NSÍ
3. VÍKINGUR
4. HB
5. B36
7. SKÁLA
8. FC HOYVÍK
9. TB/FCS/ROYN



### Agnar Prestá
*portal.fo*

**Betri Deildin MENN**
1. KÍ
2. VÍKINGUR
3. B36
4. HB
5. NSÍ
6. B68
7. 07 VESTUR
8. SKÁLA
9. ÍF
10. EB/STREYMUR

**Betri Deildin KVINNUR**
1. KÍ
2. NSÍ
3. HB
4. VÍKINGUR
5. B36
6. SKÁLA
7. FC HOYVÍK
8. TB/FCS/ROYN



### Sigurjón Einarsson
*Dimmalætting*

**Betri Deildin MENN**
1. VÍKINGUR
2. KÍ
3. HB
4. NSÍ
5. B36
6. 07 VESTUR
7. SKÁLA
8. EB/STREYMUR
9. B68
10. ÍF

**Betri Deildin KVINNUR**
1. KÍ
2. NSÍ
3. HB
4. B36
5. VÍKINGUR
6. SKÁLA
7. FC HOYVÍK
8. TB/FCS/ROYN



### Heðin Arge
*Televarpið*

**Betri Deildin MENN**
1. KÍ
2. VÍKINGUR
3. B36
4. HB
5. NSÍ
6. 07 VESTUR
7. B68
8. SKÁLA
9. ÍF
10. EB/STREYMUR

**Betri Deildin KVINNUR**
1. KÍ
2. NSÍ
3. HB
4. VÍKINGUR
5. B36
6. FC HOYVÍK
7. SKÁLA
8. TB/FCS/ROYN



### John Andersen
*Televarpið*

**Betri Deildin MENN**
1. VÍKINGUR
2. KÍ
3. HB
4. NSÍ
5. B36
6. 07 VESTUR
7. B68
8. SKÁLA
9. EB/STREYMUR
10. ÍF

**Betri Deildin KVINNUR**
1. NSÍ
2. KÍ
3. VÍKINGUR
4. HB
5. B36
6. FC HOYVÍK
7. SKÁLA
8. TB/FCS/ROYN



### Sverri Egholm
*portal.fo*

**Betri Deildin MENN**
1. KÍ
2. VÍKINGUR
3. HB
4. B36
5. NSÍ
6. B68
7. 07 VESTUR
8. EB/STREYMUR
9. ÍF
10. SKÁLA

**Betri Deildin KVINNUR**
1. KÍ
2. NSÍ
3. HB
4. VÍKINGUR
5. B36
6. SKÁLA
7. TB/FCS/ROYN
8. FC HOYVÍK



### Jógvan Skeel Nolsøe
*Kringvarp Føroya*

**Betri Deildin MENN**
1. VÍKINGUR
2. KÍ
3. HB
4. 07 VESTUR
5. B36
6. NSÍ
7. EB/STREYMUR
8. B68
9. ÍF
10. SKÁLA

**Betri Deildin KVINNUR**
1. KÍ
2. HB
3. NSÍ
4. B36
5. VÍKINGUR
7. SKÁLA
8. FC HOYVÍK
9. TB/FCS/ROYN



### Símun Christian Olsen
*Kringvarp Føroya*

**Betri Deildin MENN**
1. KÍ
2. VÍKINGUR
3. HB
4. B36
5. NSÍ
6. B68
7. 07 VESTUR
8. EB/STREYMUR
9. SKÁLA
10. ÍF

**Betri Deildin KVINNUR**
1. KÍ
2. NSÍ
3. HB
4. B36
5. VÍKINGUR
6. SKÁLA
7. FC HOYVÍK
8. TB/FCS/ROYN



### Niels Petersen
*Televarpið*

**Betri Deildin MENN**
1. KÍ
2. VÍKINGUR
3. B36
4. HB
5. 07 VESTUR
6. B68
7. NSÍ
8. SKÁLA
9. EB/STREYMUR
10. ÍF

**Betri Deildin KVINNUR**
1. KÍ
2. NSÍ
3. HB
4. VÍKINGUR
5. B36
6. SKÁLA
8. TB/FCS/ROYN
9. FC HOYVÍK



### Tróndur Arge
*Televarpið / Ellivu*

**Betri Deildin MENN**
1. KÍ
2. VÍKINGUR
3. HB
4. B36
5. NSÍ
6. 07 VESTUR
7. B68
8. EB/STREYMUR
9. ÍF
10. SKÁLA

**Betri Deildin KVINNUR**
1. KÍ
2. NSÍ
3. VÍKINGUR
4. HB
5. B36
6. SKÁLA
7. FC HOYVÍK
8. TB/FCS/ROYN



# AVBJÓÐANDI FYRIREIKINGAR



*Veturin hevur verið harður, við nógvum kava og illveðri, og tað hevur ávirkað fyrireikingarnar hjá feløgunum, ið hava gjørt seg til reiðar til eitt nýtt kappingarár*

Tað er mánakvøld tíðliga í februar mánað. Undir Mýruhjalla á Skála gera heimamenninir klárt til venjingardyst móti B68. Spælararnir eru farnir at hita upp, akkurát sum vanligt, og alt sær normalt út – ella tað ger tað ikki allíka-væl – langt frá.

Tað er kavarok, og vøllurin er allur sum hann er undir í kava – nógvum kava. Mitt inni á vøllinum stendur ein bilur hjá Runavíkar kommunu, ið hevur eina kavaplógv framman fyri. Sjaførurin ger klárt til at rudda vøllin, og tað hevur við sær, at dysturin, ið skuldi byrja klokkan seks, í øllum føri verður úsettur í eitt korter.

– Eftir ætlan skuldi vøllurin langt síðani verið ruddaður, men ein slanga til hydraulikkin á kavaplógnum fór at leka, so hon mátti skiftast, og tað hava vit akkurát gjørt, sigur Bogi Gregersen, hjálparvenjari hjá Skála. Og tað er Bogi sjálvur, saman við monnum frá kommununi, ið hevur staðið fyri at skifta hydraulikk-slanguna.

Tað, at dysturin nú er útsettur eina løtu, sær tó ikki út til at órógva spælararnar, ið halda fram við upphitingini. Gamaní skulu teir nú taka hædd fyri, at ein bilur koyrir eftir vøllinum, og serliga málmenninir mugu leypa undan nakrar ferðir. Men vandi er kortini ongantíð á ferð.

Venjararnir báðir, Pauli Poulsen og Jákup á Borg heilsa upp á hvønn annan, og avtala, at spælt verður tvær ferðir 35 minuttir. Og um so er, at dysturin verður blástur av, so finna teir hvør í sínum lagi upp á onkrar venjingar.

– Man kann altíð seta teir at renna, sigur Jákup á Borg, meðan hann heldur skeptiskur hyggur at stóru kavaflykrunum, ið verða blástar niður av himli. Eitt er kavin, men tað er eisini fitt av vindi.

Lítla løtu seinni koma dómararnir á vøllin, og teir eru sinnaðir at byrja dystin, um liðini eru samd um tað. Og tað eru tey, so her er einki at bíða við – ella jú, tað er tað. Bilurin hjá kommununi skal líka fáa síðstu kavafonnirnar av vøllinum, so kann Kári á Høvdanum seta í gongd.

At hesar umstøður ikki eru ókendar fyri føroyskar fótbóltsspælarar, sæst aftur í teirra klæðnabúnum. Nógv kreativt verður brúkt sum húgvur, og úti á beinkinum sita venjarar og eykaspælarar væl bjálvaðir.

Dysturin gongur sína gongd, og tá Kári floytar av, hevur heimaliðið vunnið 2-0. Og tað gongur eisini skjótt at tøma vøllin, og lítla løtu seinni er myrkt og kalt Undir Mýruhjalla, væl vitandi, at sólin einaferð fer at skína – eisini á Skála.

Veðrið má sær sjálvum ráða, og tað mugu sjálvt føroysku fótbóltsvenjararnir bara finna seg í. Onkuntíð hevði verið gott at havt eina fótbóltshøll.





# Í EB/STREYMI ER NÓGV BROYTT

*Síðsta kappingarár var eitt sindur blandað, við bæði upp- og niðurtúrum, sigur verjukempan, Andras Ólason Olsen, sum hevur verið sundalagsmonnum ein sannur dýrgripur síðstu kappingarárini. Hóast fleiri leikarar frá í fjør ikki eru við longur, so væntar sterki verjuleikarin tó, at EB/Streymur fer at megna at halda sær uppi*

### VIT SÍGGJA LJÓST UPPÁ TINGINI

EB/Streymur endaði á einum 6. plássi í Betri deildini í fjør, og skal tí í ár aftur royna seg millum bestu liðini í landinum, men frágongdin av leikarum er stór ásannar Andras Olsen.

Tí verður eisini sera spennandi at síggja, hvussu royndi venjarin, Sigfríður Clementsen fer at blanda kortini komandi kappingarár. Sterkasta hondin er tað ikki, men er tað nóg mikið til at yvirliva, tað er spurningurin.

Hóast stóru frágongdina, so sær Andras ljóst uppá tingini. Hann nevnir millum annað, at teir eisini undan farna kappingarári høvdu stóra frágongd, men kortini megnaðu teir væl og virðiliga at bjarga sær tilveruna í bestu deildini. – Maður kemur í mans stað, sigur fryntligi verjuleikarin.

### LANDSKAPPINGIN GÓÐTIKIN, MEN STEYPAKAPPINGIN BLEIV EITT SKUFFILSI

Móti endanum av kappingarárinum hevði EB/Streymur nóg mikið í skjáttuni til at yvirliva sannførandi, og tað fegnast Andras Olsen um, men hinvegin er hann ikki nøgdur við úrtøkuna í steypakappingini.

EB/Streymur megnaði at spæla seg til hálvfinaluna, har spælast skuldi móti B68 yvir tveir dystir. Fyrst skuldi spælast í Hólmanum á Eiði, og vónirnar vóru sostatt ikki heilt ringar. Men heldur óvæntað vant B68 burturúr heimaliðnum, og tryggjaði sær nærum finalusessin longu í fyrstu royndini. Hetta nívur 27 ára gamla verjuleikaran.

– Lutakastið var okkum gott, har vit ikki møta nøkrum av topp 4 liðunum, men kortini megnaðu vit ikki at spæla okkum til finaluna. Í stuttum kann eg siga, at landskappingin er góðkend, men at steypakappingin skuffaði, sigur Andras Olsen, sum hevur verið fastur maður í verjuni síðan í 2015.

### LEIKARI, FORMAÐUR, BORGARSTJÓRI OG TELVARI

Rógvi Egilstoft, sum í ár fer í gongd við sítt tíggjunda kappingarár fyri EB/Streym, hevur ein nýggjan leiklut afturat tí vanliga, sum leikari. Hann bleiv nevniliga, á síðsta aðalfundi felagsins, valdur til formann, og sostatt verður tað ein serlig støða at takla hjá 31 ára gamla miðvallaranum, sum eisini hevur royndir í kommunalpolitikki, har hann hevur sitið sum borgarstjóri á Eiði, samstundis sum hann hevur spælt við EB/Streymi, men eisini tá hann umboðaði NSÍ.



Andras Ólason Olsen, EB/Streymur



*Rógvi Egilstoft, EB/Streymur*

Leiklutin sum formaður røkir Rógvi fyribils, til annar verður funnin, og tí kann væntast, at tað ikki fer at órógva alt ov nógv. Royndirnar sum telvari og borgarstjóri munnu ivaleyst koma skilagóða sandavágsinginum til góðar, tí uppgávurnar verða nógvar og ymiskar, og tá er gott at megna at telva nakrar leikir fram.

Spurdur, um hann heldur at tað fer at ávirka hansara avrik á vøllinum, sigur hann avgjørdur, at tað heldur hann ikki, tí hann er vanur at hava fleiri leiklutir, og at hava fleiri hattar á.

– Tað hevur týdning at duga at skifta hatt so skjótt sum gjørligt, og bert vera í einum í senn, sigur Rógvi.

## LÍKA VIÐ OG NÆSTAN, SLÆR ONGAN SEYM FASTAN

Roynd miðvallarin metir at avrikini í fjør vóru heilt okey, men kanska eitt sindur ov óstøðug.

– Eg haldi, at liðið mentist nógv gjøgnum kappingarárið, og tað er sjálvandi at gleðast yvir. Men at vit ikki klára at taka fleiri stig móti liðunum omanfyri okkum á stigatalvuni, tað má gerast betur. Vit vóru ofta nær við, men líka við og næstan, slær ongan seym fastan, sigur Rógvi smílandi.

**“Nógvir ungir lokalir leikarar spældu nógv í fjør, og hesir leikarar gerast sterkari, og koma at gera størri mun í ár”**

Rógvi Egilstoft metir annars, at sum ítróttarfólk, og nú sum formaður, hevur tað stóran týdning, at hugsað verður stórt og jaligt. Hann ásannar at stór frágongd hevur verið, og at liðið skal styrkjast eitt sindur.

– Nógvir ungir lokalir leikarar spældu nógv í fjør, og hesir leikarar gerast sterkari, og koma at gera størri mun í ár, sigur vónríki leikandi formaðurin hjá EB/Streymi, Rógvi Egilstoft.

Til at halda skil á hópinum hava Sundalagsmenn ein av royndastu venjarunum í landinum. Sigfríður Skaale Clementsen, sum í ár fer í gongd við sítt 22. ár sum venjari. Hann hevur vunnið alt sum vinnast kann í heimligum kappingum, bæði sum leikari og sum venjari, og hann hevur eisini í fleiri førum vant lið sum ikki hava verið í oddinum. Í so máta er Siggi ein sannur fongur hjá EB/Streymi, og spennandi verður at fylgja gongdini komandi kappingarár.





Vit ynskja EB/Streymi eitt gott kappingarár

SUNDA KOMMUNA

sunda.fo



# VIT FARA EFTIR UPPFLYTINGINI

*Tað vísti seg at gerast eitt tungt kappingarár hjá argjamonnum í bestu deildini í fjør. Nógvir skaðar, nógvar broytingar í hópinum í summarsteðginum, og tað hevði, um ikki beinleiðis, so í øllum førum onkra ávirkan á úrslitini á vøllinum*

Tá alt kom til stykkis, so fluttu argjamenn niður í 1. deild, men sambært nýggja høvuðsvenjaranum, Øssuri Hansen, so ætla teir upp aftur í bestu deildini skjótast gjørligt.

## MENNING OG ÚRSLIT SKULU GANGA HOND Í HOND

– Málið er heilt greitt, at vit skulu koma upp aftur í bestu deildina, sigur avgjørdi høvuðsvenjarin hjá AB, Øssur Hansen. Toftamaðurin leggur afturat, at tað er av størsta týdningi, at menning og úrslit mugu ganga hond í hond.

– Vit koma at leggja nógv fyri í okkara venjingum, soleiðis at okkara leikarar ikki missa tann intensitetin, sum teir hava uppbygt sær í bestu deildini, sigur venjarin.

***“Málið er heilt greitt, at vit skulu koma upp aftur í bestu deildina”***

Øssur sigur eisini, at leikararnir eru tilvitaðir um, at tað liggur ein stór ábyrgd hjá hvørjum einstøkum leikara at syrgja fyri, at AB hevur eitt so gott og sunt venjingarumhvørvi sum gjørligt.

## STÓR ÚTSKIFTING Á ARGJUM

Frágongdin er stór í AB, og umframt allar teir útlendsku leikararnir, so eru nakrir av teimum berandi føroysku leikarunum eisini horvnir.

Teir sum AB hevur mist eru: Viktor Benediktsson, Sam Pollard, Santiago Lebus, Brian Jacobsen, Ragnar Skála, Ramzi Idrissou, Antonio Borelli og Marius Kryger Lindh. Men hópurin hevur eisini fingið kærkomna tilgongd. Til dømis hevur AB tryggjað sær Elias El-Moustage, sum meiddi sær hondina somikið illa, tá hann spældi fyri EB/Streym í 2022, at læknar viðmæltu at hann steðgaði við fótbólti. Men hondin er nú aftur í somikið góðum standi, at Elias aftur er klárur til at trýna inn á vøllin.

Elias er ein sera góður miðvallari, og hann hevur millum annað verið millum teir mongu røsku sum hava vunnið Føroyum stóran heiður við framúr úrslitum á U21 landsliðnum fyri fáum árum síðani. Elias hevur mammu úr Havn og pápa úr Marokko. Hann byrjaði at spæla í ungdómsdeildini hjá TB, áðrenn hann flutti til Danmarkar, har hann umboðaði AaB. Í 2021 kom hann til EB/Streym, og nú er hann í AB.

Tilgongdin telur eisini aðrar royndar leikarar, sum Sørin Samuelsen, Tóka Rasmussen, Rasmus Dan Sørensen og Ari Krosslá Poulsen.

Sambært Nela Heldarskarð, sum er við til at taka sær av at reka besta liðið hjá Argja Bóltfelag, so kunnu vit møguliga vænta, at onkur tilgongd av leikarum kemur afturat. Men Neli staðfestir, at tað verða ikki so nógvir útlendingar sum vit eru blivin von við á Argjum seinasta árini.

*Øssur Hansen, AB-venjari*



## ÆTLA UPP BEINANVEGIN

Neli Heldarskarð var partur av venjaratoyminum hjá AB í fjør, og í ár er hann sjálvur annar partur av einum toymi, sum hevur til uppgávu at reka besta liðið hjá AB.

**“Vit vóna at samstarvið við FCK kann vera við til at lyfta og styrkja um ungdómsdeildirnar soleiðis, at felagið sjálvt kann framleiða leikarar til besta mansliðið”**

– Málið er avgjørt at flyta beinleiðis upp aftur í Betri deildina. Seinastu tvær ferðirnar, tá AB hevur verið í 1. deild, hava vit megnað at flutt upp beinanvegin, og hetta ætla vit at endurtaka, sigur Neli Heldarskarð, sum sjálvur spældi við AB, áðrenn skaðar steðgaðu honum.

– Beint nú hevur felagið ein spennandi og lokalan hóp, og við onkrum styrki afturat, meta vit avgjørt, at tað er realistiskt, at vit flyta upp í ár.

Ein portugisi kemur einaferð í februar, og umframt venjarauppgávur, fer hann eisini at spæla við besta liðnum, sigur Neli. Hann staðfestir eisini, at tørvur væntandi eisini verður á einum álopssinnaðum styrki afturat.

## FLEIRI LOKALIR SKULU SLEPPA FRAMAT

Herfyri varð kunngjørt, at Argja Bóltfelag og danska stórfelagið, FC København eru byrjaði at samstarva um ungdómsfótbólt. Neli Heldarskarð sigur, at talan ikki verður um nakra ávirkan á besta liðið hjá AB, í øllum førum ikki í fyrstu syftu.

– Vit vóna at samstarvið kann vera við til at lyfta og styrkja um ungdómsdeildirnar soleiðis, at felagið sjálvt kann framleiða leikarar til besta mansliðið. Soleiðis sleppa vit undan at fara eftir nógvum útlendingum, sigur Neli Heldarskarð.

Høvuðsvenjarin, Øssur Hansen staðfestir, at tað eru nakrir ungir og spennandi leikarar á veg á Argjum, men hann sigur eisini, at tað er av størsta týdningi, at hesir fyrst og fremst skulu vísa seg í einum sunnum venjingarumhvørvi, og síðani verður møguliga talan um okkurt gjøgnumbrot hjá AB í ár.



Neli Heldarskarð, AB







# Heilsugóður laksur

**Laksur er føðsluríkur og framúr góð protein-, vitamin- og mineralkelda. Serliga áhugaverdar eru omega-3 feittsýrurnar, ið stimbra heilan og smyrja liðirnar.**

Bakkafrost útflytir tað, sum svarar til omanfyri 1.000.000 døgurðar av laksi um dagin – til allan heimin. Heilsugóði og vælsmakkandi laksurin frá Bakkafrost fæst eisini í flest øllum handlum í Føroyum.

Tú finnur leskiligar uppskriftir við laksi her:

Bakkafrost P/F • Bakkavegur 9 • FO-625 Glyvrar • Tel 40 50 00 • www.bakkafrost.com

# TAÐ VERÐUR STUTTLIGT AT HYGGJA EFTIR ÍF

*Soleiðis sigur venjarin hjá ÍF, Alexander Jovevic, sum gleðir seg til eitt nýtt kappingarár í Betri Deildini. Fulgfirðingar tryggjaðu sær sætið í fremstu deildini, tá Karl Løkin skoraði uppá brotsspark í 93. minutti móti TB í 26. umfari í fjør*

– Løtan, tá Karl skoraði, var ótrúlig. Tann gleðin kann ikki lýsast við orðum. Samanlagt havi eg verið í ÍF í 10 ár, og einasta málið, sum eg minnist, ið hevur havt líka stóra týdning fyri ÍF og allar fjepparnar var, tá Bartal Eliasen skoraði avgerandi málið móti GÍ í síðsta umfari í 2010, og tað samstundis tryggjaði okkum evropeiska luttøku. Og tá Karl skoraði móti TB, sá eg endiliga ta gleðina aftur í eygnum á okkara viðhaldsfólkum. Eg segði við mínar leikarar, at tað eru løtur sum hesar, ið vit spæla fyri.

Hóast yvirlivingin ikki varð tryggjað fyrr enn heilt móti endanum, so er Alexander nøgdur við kappingarárið í fjør.



– Liðið var ikki nógv broytt frá árinum fyri, tá vit spældu í 1. deild, og tí var 2023 eitt gott ár hjá okkum, har nógvir ungir leikarar fingu møguleikan. Tað hevði sjálvandi verið lættari, um vit høvdu tryggjað okkum pláss í Betri Deildini tíðliga, men eg eri vísur í, at bæði spælarnir og eg sum venjari, hava lært eina rúgvu. Tað er júst tað, sum tær truplu tíðirnar gera. Eg vænti at hetta fer at gagna okkum í ár.




***Bogi Reinert Petersen, ÍF***



Uros Stojanov, ÍF



## GAMLIR KENNINGAR KOMNIR HEIM AFTUR

Tveir gamlir kenningar eru komnir heim aftur til ÍF. Bogi Reinert Petersen, sum hevur spælt tvey ár í EB/Streymi, og Uros Stojanov, sum var toppskjútti í ÍF fyrsta árið hann var í Føroyum.

– Teir báðir fara heilt avgjørt at styrkja um hópin. Teir kenna felagið, og tí fer tað heldur ikki at taka langa tíð hjá teimum at fella til. Seinast teir vóru her, endaði tað við niðurflyting, so eg eri vísur í, at teir eru motiveraðir til at geva alt fyri ÍF, sigur serbiski venjarin, sum hevur verið í Føroyum síðani 2003.

Hann er vónríkur um komandi kappingarár, og sigur, at fólk kunnu gleða seg til at fylgja ÍF.

– Vit spæla hvønn dyst við trúnni upp á, at vit kunnu vinna. Hetta gav okkum sjálvsálit í fjør, og hjálpti okkum í avgerandi dystunum. Hvussu langt tað fer at røkka í ár, fáa vit at síggja, men eg kann við vissu siga, at tað verður stuttligt og áhugavert at hyggja eftir ÍF í ár, sigur Alexander Jovevic at enda.

***“Vit spæla hvønn dyst við trúnni upp á, at vit kunnu vinna”***





Vit ynskja ÍF góða eydnu við kappingarárinum

Fuglafjarðar kommuna
fuglafjordur.fo



Signe Pries Andersen, landsliðsvenjari hjá kvinnum

**Kvinnulandsliðið skrá 2024**

| | | |
|---|---|---|
| 22. februar | Kv. | Malta – Føroyar ( venjingardystur ) |
| 25. februar | Kv. | Albania – Føroyar ( venjingardystur ) |
| 5. mars | Kv. | Lutakast / EM 2025 |
| 3. - 9. apríl | Kv. | EM-undankapping |
| 27. mai - 4. juni | Kv. | EM-undankapping |
| 8. - 16. juli | Kv. | EM-undankapping |

# Lærdu nógv av Nations League

*Í 2023 var fyrstu ferð skipað fyri Nations League kapping fyri kvinnur. Tað var eisini spenningur undan Nations League kappingini, tí nú skuldu føroysku kvinnurnar møta liðum við áleið somu styrki. Nakað, ið fleiri høvdu eftirlýst, tí tað hevur ofta verið sera stórur munur á liðunum, tá ið vanligu undankappingarnar hava verið spældar*

Hetta var samstundis fyrsta kappingin hjá nýggja venjaranum, Signe Pries Andersen, sum tók við, eftir at Lene Terp takkaði fyri seg í desember 2022.

Tað var ein áhugaverdur bólkur, ið Føroyar komu í. Kýpros, Aserbadjan og Montonegro vóru mótstøðuliðini. Vónirnar vóru góðar, men hóast nøkur góð avrik, so endaðu Føroyar uttan nakað stig. Men sjálvt um okkara kvinnur endaðu aftast í bólkinum, so staðfestir Signe, at Nations League kappingin var lærurík.

– Vit lærdu nógv av kappingini, har vit mentu okkum nógv á tí taktiska økinum, samstundis sum vit eisini gjørdust betri á bóltinum, sigur Signe Pries Andersen, sum hevði vónað at fingið okkurt stig á kontuna.

Helst er tað serliga dysturin á heimavølli móti Kýpros, sum Signe og hinar á liðnum iðra seg um. Tí hóast eitt greitt yvirtak í bæði spæli og málmøguleikum, har fleiri møguleikar vóru sera stórir, so endaði dysturin við teprum sigri til kýpriotar.

## TRÍVIST VÆL Í FØROYUM

Tað var tann 17. mars í fjør, at Fótbóltssamband Føroya kunngjørdi nýggja landsliðsvenjaran. Hon byrjaði formelt í starvinum 1. juni og flutti til Føroya saman við manninum og báðum børnunum. Og tey eru follin væl til í Føroyum.

– Her er gott at vera. Vit komu skjótt uppá pláss í Føroyum, og fingu skjótt ein gerandisdag. Eg trívist eisini væl í mínum starvi, har eg síggi stórar møguleikar, sigur danski venjarin og leggur afturat, at føroyska málið tó enn er ein avbjóðing.

***"Eg trúgvi uppá menningina, og trúgvi uppá at vit um trý ár hava flutt okkum nógv"***

– Vit hava verið í Føroyum í eina tíð nú, og eg byrji at skilja samanhangin í teimum samrøðum, sum ganga fyri seg á føroyskum.

## GÓÐAR VÓNIR TIL KOMANDI UNDANKAPPING

Seinni í ár stendur EM-undankapping á skránni. Undankappingin er skipað á tann hátt, at londini verða deild upp í deildir, eins og í Nations League, har Føroyar eru í deild C. Vinna Føroyar sín bólk í deild C, so skulu Føroyar spæla Play Off dyst móti liði úr deild A. Signe hevur góðar vónir til undankappingina, og hon hevur eisini greiðar ætlanir.

– Lutakastið hevur sjálvandi stóran týdning til eina slíka undankapping, men eg vóni og trúgvi fult og fast uppá, at vit kunnu vinna okkara bólk, og harvið tryggja okkum víðari luttøku. Vit hava ment okkum nógv, og eg síggi stórar møguleikar við hesum liðnum, sigur Signe Pries Andersen at enda.

Lutakastið til komandi EM undankapping verður í Sveis týsdagin 5. mars.

Tá Signe skrivaði undir við FSF, var talan um eina fýra ára langan sáttmála. Eitt knapt ár farið, og dámligi danski venjarin gleðir seg til tey komandi trý árini.

– Eg trúgvi uppá menningina, og trúgvi uppá at vit um trý ár hava flutt okkum nógv. Framtíðin sær bjørt út, sigur Signe Pries Andersen at enda.

Lutakastið til EM undankappingina verður 5. mars.

# NÓGVAR BROYTINGAR Í GUNDADALI

*Bæði hjá kvinnum og monnum eru nógvar útskiftingar. Kvinnurnar hava sagt farvæl við brasilsku leikararnar, og menninir hava skift nærum helvtina av liðnum út*

Hjá Dan Brimsvík og hansara monnum sá leingi út til, at kappingarárið í 2023 fór at verða eitt av teimum heilt góðu. Teir lógu leingi væl fyri í landskappingini, og vóru eitt tíðarskeið einastu avbjóðarnir til KÍ. Men síðstu umførini vendist alt á høvdið, og var tað ikki fyri kærkomna hjálp frá grannunum úr HB, so spældi B36 ikki Conference League í 2024.

**OG HØVUÐSVENJARIN ER IKKI NØGDUR VIÐ 2023**

– Tað er ymiskt, ið vit kunnu gera betri í ár, og endin á kappingarárinum í fjør var ikki nøktandi. Hinvegin, so vóru nógv góð viðurskifti, ið vit kunnu taka við okkum inn í 2024. Vit mentu okkum nógv samanborið við 2022, og royndu at bjóða av. Samstundis høvdu vit eitt gott ár í evropeiskum fótbólti, sigur Dan, og leggur afturat, at nú er tað upp til teir sjálvar at byggja víðari og taka næsta stigið.

Hóast nógvar broytingar, so er talan um ein spennandi hóp og venjarin, sum nú fer í gongd við sítt fjórða kappingarár sum høvuðsvenjari hjá teimum hvíttklæddu í Gundadali, er væl nøgdur við tilgongdina.

***“B36-liðið í 2024 verður eitt vet sterkari enn í 2023. Vit ætla okkum at bjóða av í FM stríðnum”***



*Bjarki C. Nielsen og B36-venjarin, Dan Brimsvík*

– B36 liðið í 2024 verður eitt vet sterkari enn í 2023. Vit ætla okkum at bjóða av í FM stríðnum, sigur Dan Brimsvík.





Arnbjørn Danielsen, venjari hjá B36 kvinnum

*Gutti Dahl Olsen og Valborg Østerø, B36*

## KVINNURNAR BYRJA AV NÝGGJUM

Í fjør var ein brasilsk innrás í B36, men allar fýra eru farnar úr felagnum – umframt fimm aðrir royndir leikarir, sum eru givnir. Tað verður tí eitt nýtt ungt lið, sum skal manna B36 í ár.

Nýggjur venjari er Arnbjørn Danielsen.

– Hetta er eitt nýtt, ungt og óroynt lið. Men hetta er nakrir svangir leikarar, sum vilja royna seg móti teimum sterkastu liðunum.

B36 endaði í fjør á einum fjórða plássi í landskappingini, men vóru bara fimm stig frá nummar tvey.



– Málið er at byggja eitt nýtt lið upp, sum kann spæla við í toppinum um ikki alt ov langa tíð, sigur Arnbjørn.

Ein leikari, sum nú telist millum tær royndu á kvinnuliðnum hjá árstalsfelagnum í Havn, er Valborg Østerø. Hon verjir aftur í ár málið hjá B36, og hon er greið yvir, at tað liggur størri ábyrgd á henni nú.

– Mín leikltur verður nú eisini at tryggja at allar í hópinum kenna seg væl – bæði á vøllinum og uttanfyri vøllin, sigur Valborg, sum ásannar, at tað eru nógvar broytingar frá í fjør.

– Nógvir leikarar eru farnir, og vit hava fingið nakrar nýggjar. Venjaratoymið er eisini nýtt, har vit nú eisini hava fingið ein fysiskan venjara. Og tað merkist, tí allar leggja nógv fyri á vøllinum og í styrkirúminum. Og hóast nógvar broytingar, so hava vit sett høg krøv til okkum sjálvar.

Valborg hevur seinastu árini verið partur av landsliðnum, har hon fyri tað mesta hevur sitið á bonkinum. Men Valborg ætlar sær fleiri dystir.

– Eg ætli at menna meg sum leikara, og so ætli eg sjálvandi at fáa fleiri landsdystir, sigur B36 málverjin.

Valborg Østerø er higartil skrásett fyri tríggjar A-landsdystir fyri Føroyar.





# FORTREYTIRNAR BROYTTAR MEN MÁLIÐ ER TAÐ SAMA

*Málið var greitt, tá Jákup á Borg tók yvir á Toftum. Um trý ár skal B68 verða partur av toppinum í føroyskum fótbólti. Tað sá eisini spennandi út – fyrstu tíðina í øllum førum*

Men fíggjarligt óskil, manglandi løn og eitt sjeynda pláss í landskappingini í 2023 vístu, at B68 ikki enn er við at gerast partur av toppinum – enn í øllum førum. Tí toftamenn vóru so óendaliga nær við at tryggja sær evropeiska luttøku í fjør. Eitt misnýtt brotsspark í einari tættari steypafinalu leygarkvøldið 4. november í fjør, var tað, ið skilti B68 frá gulli og nøkrum milliónum á kontoini.

– Tað er sjálvandi keðiligt at vera so nær við og allíkavæl tapa. Men hetta sigur mær bara, at vit kortini ikki eru so langt frá at kunna skapa nakað serligt á Toftum. Eg eri ógvuliga stoltur av mínum monnum og hvussu væl teir vóru við í finaluni. Hóast tað var hart at standa eftir sum tapari, so standi eg nú eftir við einari góðari kenslu av stoltleika.

***"Vit eru kortini ikki so langt frá at kunna skapa nakað serligt á Toftum"***

Tað sigur venjarin hjá B68, Jákup á Borg, sum nú fer undir sítt triðja kappingarár í B68, eftir at hann tók yvir á Toftum miðskeiðis í 2022.

### JÁKUP TRÝR FRAMVEGIS UPPÁ TAÐ

Hóast fortreytirnar hjá Jákupi og hansara toymið nú eru broyttar, so trýr havnamaðurin á Svangaskarði framvegis uppá, at B68 skjótt verður topplið í Føroyum.

– Hettað er annað árið, har eg eri við frá byrjan, og fortreytirnar eru broyttar



*Jákup á Borg, B68-venjari*









nakað. Fíggjarliga orkan er ikki tann sama, og vit hava mist fleiri lyklaleikarar, og tí fer tað helst at taka longri tíð at náa málinum.

– Tað er umráðandi at seta sær mál og tora at droyma stórt – og tað gera vit. Eg dugi ikki at síggja, hví vit ikki skulu røkka toppinum í føroyskum fótbólti, hóast hendan tilgongd helst má leingjast við tveimum árum, sigur fryntligi havnamaðurin. Hann leggur afturat, at hóast tað var rokaligt, so umhugsaði hann ongantíð at tveita handklæðið í ringin.

## KUNNU GERA TAÐ BETRI ENN Í FJØR

B68 hevur mist átta leikarar, sum vóru fastur partur av hópinum í fjør. Samstundis eru ikki nóg mikið av pengum í kassanum til at keypa fleiri nýggjar leikarar. Tí verða tað ungu toftamenninir, við eitt sindur av kryddri aðrastaðni frá, ið skulu manna B68 liðið í ár. Og venjarin trýr uppá, at teir kunnu gera tað betri enn í fjør.

***"Eg dugi ikki at síggja, hví vit ikki skulu røkka toppinum í føroyskum fótbólti"***

– Vit vilja verða meira avgjørdir í dystunum komandi kappingarár. Vit vóru ikki nóg dugnaligir at umseta okkara kjansir til mál, og samstundis fóru ov nógv bílig mál ígjøgnum í hinum endanum. Gera vit hetta betri í ár, so merkir tað eisini, at vit gera tað betri enn í 2023, sum eisini er málið hjá okkum. Steypafinalan í fjør var eisini ein stór uppliving, og tað vilja vit fegnir uppliva umaftur – tó hesaferð vilja vit vinna hana, sigur Jákup á Borg at enda.







# GILLI KOMIN HEIM

Gilli Rólantsson Sørensen, TB

*TB flutti niður aftur úr bestu deildini í fjør, eftir eitt kappingarár, sum var merkt av, at liðið hevði merkverdiga torført at skjóta mál. Tað eydnaðist bert at skjóta 15 mál í teimum 27 dystunum, og tað rakk ikki til framhaldandi luttøku í Betri Deildini*

TB skal tískil komandi kappingarár aftur leika í næstbestu deildini, og sambært heimafturvendaGilla Rólantsson Sørensen, so ganga fyrireikingarnar væl. Talan er nú um eina endurbyggjan av TB og stóri profilurin, sum væntandi skal ganga undan, á og uttanfyri vøllin er royndi landsliðsleikarin, Gilli Rólantsson Sørensen.

Nýggjársaftan slepti Tvøroyrar Bóltfelag eini ordans bumbu. Tá kunngjørdi felagið, at sáttmáli var gjørdur við 30 ára gamla landsliðsleikaran, ið seinastu nógvu árini hevur spælt uttanlands. Talan er um ein óvanliga langan sáttmála – sáttmálin er galdandi í fimm ár – og avtalan inniber millum annað, at Gilli, umframt at vera ein av teimum berandi leikarunum á vøllinum, eisini skal vera við til at endurbyggja barndómsfelagið.

Gilli Rólantsson Sørensen var veruliga við til at styrkja um verjupartin í fyrru kappingarhálvu í fjør, men tá hann fór uttanlands aftur at royna seg, vísti tað seg, at tað fór at ganga verri hjá TB, og í síðsta enda megnaðu tvøramenn ikki at varðveita sessin í bestu deildini.

**“Eg eri komin hartil, at nú vil eg geva TB aftur av øllum tí, ið eg havi roynt”**

## GILLI Í TB KOMANDI FIMM ÁRINI

Nakað av frágongd hevur verið hjá TB í vetur, og tað inniber millum annað, at onkrir royndir spælarar eru farnir aðrastaðni at royna seg. Men norski miðvallarin, Markus Thorberg er enn á Tvøroyri, og hevur nú enn størri ábyrgd, tí í ár er hann høvuðsvenjari hjá TB.



















Afturat sær hevur hann ein sera royndan leikara í Gilla Rólantsson Sørensen, sum nú hevur játtað seg til at koma heim at hjálpa við at byggja felagið upp, á og uttanfyri vøllin. Gilli hevur við sínum drúgvu royndum eina ørgrynnu at geva ungu leikarunum á Tvøroyri, og sum hann sjálvur sigur, so brennir hann veruliga fyri hesari uppgávuni.

– Eg eri komin hartil, at nú vil eg geva TB aftur av øllum tí, ið eg havi roynt, og harafturat eri eg nú heima, her eg havi mína familju og mínar vinir heilt tætt uppá, og eg veruliga elski tilveruna í løtuni. Eg havi ikki verið so glaður í langa tíð, sigur afturvendi TB sonurin.

## FELAGIÐ SKAL ENDURBYGGJAST

– Tað skal verða sum fyrr, tá man elskaði at spæla fótbólt, og ikki sum í dag, har eg onkuntíð havi varugan av, at man bert dámar tað, sigur ein bersøgin Gilli Sørensen. Hann leggur afturat, at tað skal uppbyggjast ein fótbóltsmentan í TB, har man venur knallhart, man venur nógv, og man livir sunt. og Gilli vil hava øll við.

Í ár verður dentur lagdur á at uppala og læra ungu leikararnar eina spælskipan, sum ætlandi skal fylgjast framyvir. Fótbóltsmentanin má broytast, sigur Gilli.

Hann gleðist yvir, at tað beinanvegin sæst at teir ungu taka væl ímóti nýggja leistinum, og at vera í TB er nakað heilt serligt.

– Í mínum hugaheimi er tað onki skiftingarrúm í heiminum, sum er eins gott sum tað hjá TB, og hann sigur seg vera bæði hepnan og stoltan at vera partur av hesum fantastiska felagskapinum.

**_“Tað er onki skiftingarrúm í heiminum, sum er eins gott sum tað hjá TB”_**

Nikolei Johannesen er millum teir royndastu yngru leikararnir í TB hópinum, og við sínum bert 22 árum verður hann uttan iva ein av teimum sum fara at ganga undan komandi kappingarár. Nikolei hevur spælt 124 dystir á besta TB liðnum, og vit hava sett honum stevnu, um farna og komandi kappingarár.

## KUNNU BERT TAKKA OKKUM SJÁLVUM

Tað var øðiliga keðiligt, at vit akkurát ikki kláraðu tað í fjør, men vit kunnu bara takka okkum sjálvum fyri, at vit ikki vóru meira avgjørdir, tá tað skuldi avgerast, sigur ungi maðurin av Sevmýru.

*Hvat væntar tú tær av komandi kappingarári?*

– Vit fara inn fyri at vinna allar dystir, og allir leikararnir venja miðvíst og hart fyri at sleppa upp í bestu deildina aftur.

*Hvørja ávirkan hevur tað á tykkum, at Gilli er komin heim aftur?*

– Á vøllinum er Gilli ein klassaleikari. Hann kemur við nógvum kvaliteti og rutinu, men eisini hevur hann nógv at geva okkum yngru, tí hann veit hvat skal til, og hann forlangar nógv av okkum, samstundis sum hann pressar okkum meira, fyri at gera okkum betur, sigur ein spentur Nikolei.

At enda leggur Nikolei afturat, at hann er sera vónríkur, tí ongantíð hava so nógvir ungir leikarar verið í hópinum.

– Tað krevur nógv av ungu leikarunum, men tá kappingarárið er yvirstaðið, tá ivist eg ikki í, at fólk byrja at tosa um onkran av ungu spírunum hjá TB, sigur evnaríki miðvallarin.

Formaðurin í Tvøroyrar Bóltfelag, André Dalfoss, fegnast um, at tað sær skilagott út higartil, og hann er ikki sørt vónríkur, hóast nógvar broytingar í hópinum.

– Vit eru í gongd við at finna ein skynsamari rakstur av felagnum, og við hjálp frá millum øðrum Gilla Sørensen kring hópin, so er eisini ætlanin at fáa felagið í eina trygga fíggjarliga legu, og í størstan mun dúva upp á egnar lokalar leikarar, sigur André Dalfoss.







Teitur Matras Gestsson og Áki Samuelsen

# HB FER EFTIR MEISTARA-HEITINUM

*Seinasta meistaraheitið HB vann var í 2020, og síðani er tað blivið til eitt silvur og tvey bronsumerki. Hetta nívir tey í sigursvanda høvuðsstaðarfelagnum, og tí vilja allir HB fjepparir hava eitt lið, sum enn betur kann hótta gamla arvafíggindan úr Klaksvík*

Sambært unga álopsessinum, Áka Samuelsen, so verður tað tættari í oddastríðnum í ár enn farnu árini.

– Eg vænti mær eitt spennandi kappingarár fyri HB. Vit hava eitt nýtt venjaratoymi, sum virkar sera gott, og eg haldii at liðið er væl mannað á øllum plássum, sigur ungi áloyparin.

Áki, við tí framúr góða bóltførleikanum, hevur seinastu árini verið fastur maður í besta hópinum, og hóast hann altíð hevur sum persónligt mál, at betra seg, so er tað fyrst og fremst eitt meistaraheiti til HB, sum telur mest hjá kvika bóltsnillinginum.

### TRÍGGIR BEIGGJAR FØRA ARVIN VÍÐARI

Áki Samuelsen er sonur kvikbeinta fyrrverandi HB bumbaran, Eyðun Samuelsen, og nú eigur hann tveir synir á besta HB liðnum. Tí umframt Áka, so eru 17 ára gomlu tvíburðarnir, Djóni og Jónas esini kringir fótbóltsleikarar.

Djóni fekk sínar fyrstu minuttir á besta liðnum í fjør, og tá Jónas kemur seg heilt, eftir skaða, fara vit ivaleyst eisini at síggja hann føra arvin víðari. Tað verður ein av teimum heilt hugaligu søgunum, tá Jónas eisini trýnir á vøllin fyri fremsta HB liðið.

Ivaleyst ein løta sum Eyðun hevur droymt um leingi, og nú verður hon kanska hvørja løtu. Hann hevur nógv at vera stoltur av, tað er púra sikkurt.

### VIT ERU STERKARI Í ÁR

– Eg vænti at liðið verður uppaftur sterkari í ár, sigur ungi álopsleikarin hjá HB. Áki ásannar, at teir gamaní hava mist nakað av leikarum, men samstundis hava teir eisini fingið spennandi leikarar inn, umframt teir ungu sum svangir bíða eftir sínum møguleika.

– Tá liðið er væl samanspælt, vænti eg, at vit verða minst líka sterkir sum farna kappingarár, sigur Áki Samuelsen.

### TEITUR SPÆLUR FYRI AT VINNA

– Persónliga ætli eg mær at spæla fyri at vinna, men tað er torført ov tíðliga á árinum til at meta um, hvussu tað fer at ganga. Men vónandi fara vit at kappast um gullið í ár, sigur royndi landsliðsleikarin, liðskiparin og tryggi aftasti skansin hjá HB.

Ofta eru tað bara marginalar sum avgera, um tað verður mett sum eitt góðtikið kapingarár, ella um tað verður mett sum eitt skuffandi ár.

– Sum heild var avrikið gott, tá alt kom til stykkis. Men koppaði steypafinalan ikki okkara veg, so vil eg ikki siga at árið hilnaðist so væl sum vit kundu hugsað okkum, sigur HB málverjin.

### SKJÓTT 400 DYSTIR FYRI HB

Teitur Matras Gestsson hevur higartil leikt 385 dystir fyri besta liðið hjá HB, tá allar kappingar eru taldar við, umframt 7 dystir í 1. deild. Sambært hagtølum hjá Faroesoccer.com hevur Teitur eisini umboðað Føroyar 13 ferðir á U17 landsliðnum, fýra ferðir á U19, seks ferðir á U21 og 23 ferðir á A-landsliðnum. Ein livandi legenda, sum enn kann náa at spæla eina ørgrynnu av dystum fyri bæði felag sítt og landslið okkara.

### OV NÓGV RUMBUL Í FJØR

– Venjaraskifti og annað órógvaði okkum eitt sindur í fjør, men nú vænta vit at fáa støðufesti. Vit eru í gongd við at flyta felagið og liðið í eina trygga legu til komandi kappingarár, sigur royndi liðskiparin.

Hóast talan aftur í fjør bleiv um eitt triða pláss til HB í Betri Deildini hjá monnum, aftanfyri Víking á øðrum plássi, og KÍ á ovastu rók, so er tað tó greitt, at teir reyð-svørtu fingu fleiri mál og fleiri stig í '23, samanborið við kappingina í 2022.

Heili 12 mál fleiri megnaði liðið at skora í fjør, og í verjustøðu lat liðið eisini fýra mál færri fara ígjøgnum. Samanlagt gav tað teimum eisini trý stig fleiri enn í 2022. So framgongd er hóast alt at síggja hjá HB, og tað kunnu havnarmenn altíð brúka sum íblástur í teirri jagstran eftir FM heitinum, sum klaksvíkingar annars hava lagt seg tungt á farnu árini.

### MEST VINNANDI FELAG

Havnar Bóltfelag hevur higartil vunnið meistaraheitið 24 ferðir og steypakappingina 29 ferðir, og heili 13 ferðir er tað blivið til greipusigrar. Síðsta greipan varð vunnin í 2020.

Eitt so sigursvant felag vil uttan iva spenna bogan rættiliga nógv, fyri aftur at standa ovast á heiðursmerkjaskamlinum, og soleiðis eisini forða KÍ í at innheinta teir á hagtalslistanum. KÍ hevur sambært heimasíðuni hjá FSF higartil vunnið bestu deildina 21 ferðir og steypakappingina seks ferðir.








## HB GEVUR TEIMUM UNGU MØGULEIKAN

Elin Maria Isaksen, vanliga nevnd Elmy er royndasti leikarin á besta kvinnuliðnum hjá HB, og hon heldur, at triða plássið í kappingarárinum í fjør var góðtikið.

– Tað vóru fá sum mettu okkum megna at blanda okkum í heiðursmerkjastríðið í Betri Deildini í fjør, men tað megnaðu vit við manér, sigur royndi verjuleikarin.

Elin Maria metir at HB í ár verður eitt lið, sum gerst sterkari.

– Vit fara at byggja víðari á stóru menningina frá í fjør, sigur Elin Maria, og hevur hug at rósa kvinnunevndini og venjarunum, við Lukasz Cieslewicz á odda, fyri teirra arbeiði, og sum hon sigur, so sæst tað aftur beinanvegin.

Elin Maria viðgongur, at hópurin er ungur, men at tær ungu allar fáa gyltar royndir á hesum liðnum, og massar av spælitíð.

– Tær ungu gerast bara betur og betur, og tað gerast tær, tí hjá okkum fáa tær nógva spælitíð, sigur Elin Maria, sum byrjaði í HB fyri ellivu árum síðani.

## BYRJAÐI SUM ÁLEYPARI

Elin Maria Isaksen hevur seinastu árini einamest spælt á onkrum av verjuplássunum, men hon byrjaði sum áleypari, og hon hevði eitt ávíst máltev eisini. Tað hevur hon enn, og serliga er tað hennara knallhørðu skot, sum mangan hava gagnað HB, serliga í deyðbóltsstøðum.

Eisini eru hennara longu og beinraknu diagonalsendingar afturum verjuna hjá mótstøðuliðunum nakað, sum eyðkennir roynda leikaran, og tað minnir ikki sørt um frálíku sendingarnar hjá fyrrverandi norska vinstrabakkinum, Stig Inge Bjørnebye, sum eins og Elmy meistraði slíkar sendingar.

Elin Maria hevur spælt 302 dystir í bestu deildini, og hevur skotið heili 88 mál. Á landsliðnum hevur Elmy eisini roynt seg, og higartil er tað blivið til tveir A-landsdystir fyri Føroyar.

## ÆTLA AT KAPPAST Í ODDINUM

17 ára gamla Fríða Magnusardóttir Jakobsen er ein av mongum heilt ungum leikarum hjá HB, og hon heldur, at tær reyð-svørtu fara at kappast í oddinum komandi kappingarár.

– Vit ætla at kappast í oddinum í ár, og harafturat ætla vit at spæla okkum í steypafinaluna, sigur ungi verjuleikarin, sum eisini væl kann spæla á miðvøllinum.

Hóast sín unga aldur, so hevur Fríða longu leikt 53 dystir fyri besta liðið hjá HB. Og persónliga málið hjá henni til komandi kappingarár er, at gera alt fyri at sleppa á U19 landsliðið.

Fríða er ein ungur leikari, við einum stórum yvirblikki. Hon hevur sera góð fótbóltsevnir, og er partur av einum avbera spennandi árgangi hjá HB. Fleiri eru komnar inn á besta liðið, og longu eru nýggir yngri leikarar eisini klárar at taka av sínum møguleikum.

## KVINNUNEVNDIN SKAPAR KARMAR OG TRIVNAÐ

Magnus Jakobsen hevur í mong ár, saman við konu síni, Eyðvør Jakobsen vant eitt ótal av ungum gentum hjá HB, men í ár er hann partur av einari spennandi kvinnunevnd hjá Havnar Bóltfelag. Spurdur, hvussu tað gagnar kvinnuligum leikarum, at ein nevnd tekur sær av øllum á kvinnusíðuni í felagnum, svarar Magnus greitt.

– Vit vóna og vænta, at tað kemur at gagna øllum, frá teimum yngstu og upp til besta liðið. Vit skulu vónandi megna at skipa soleiðis fyri, at fáa alt at koyra somikið væl, at leikarar og leiðarar kunnu leggja alla sína orku í fótbóltin, sigur Magnus, sum er ein av mongu eldsálunum í HB.

– Liðið er ungt, so vit seta ikki veruleikafjar mál. Men at kappast í oddinum, tað er tó málið til komandi kappingarár, sigur Magnus, og leggur afturat, at tað tó er av størsta týdningi, at halda fast í góðu gongdini seinastu árini, har nógvir dugnaligir leikarar verða settir við á hvørjum ári.

– Høvuðsmálið er at arbeiða fyri at hava best hóskandi umstøður at spæla fótbólt, og sosiali parturin verður á ongan hátt gloymdur. Og tað er púra sikkurt, at megna vit at fáa ítróttarliga og sosiala partin at samspæla væl, so verður úrslitið helst gott, sigur Magnus Jakobsen, sum situr í kvinnunevndini hjá Havnar Bóltfelag.






# BUSTA GAGGURNAR

Hvørt ár fara fleiri tons av granulati av vøllunum í kommununi og enda sum mikroplast í náttúruni.

Tú kanst gera mun, við at busta og tøma gaggurnar, hvørja ferð tú fert av vøllinum. Tá gerast tons til kilo.

#BUSTAGAGGURNAR

TÓRSHAVNAR KOMMUNA

# Ein fjarskotin dreymur ella ein nýggjur veruleiki?

*Í nøkur ár hevur málið í Klaksvík verið at koma í eitt evropiskt bólkaspæl. Tá var tað ein fjarskotin dreymur, sum nú er komin nærri við UEFA Europa Conference League kappingini. Í fjør sprongdi KÍ øll mørk fyri, hvat eitt føroyskt lið kann seta sær sum mál*



Við at vinna seg í bólkaspælið skrivaði KÍ seg í søgubøkurnar, men hvat skulu vit vænta í framtíðini? Er hetta byrjanin til eina tilveru við evropiskum bólkaspæli, ella var hetta eitt langskot, ið aldrin verður endurtikið?

## KÍ FÓR LANGA VEGIN RUNT

Søguliga plássið í bólkaspælinum bleiv tryggjað við einum knallhørðum brotssparkið í Gøtuborg. Maðurin, sum átti sparkið, var 35 ára gamli Vegard Forren. Tað kravdi eisini alt av venjaranum, Magne Hoseth, at venda dystinum í longdu leiktíðini. Um sína bestu taktisku avgerð í Evropaferðini sigur nú fyrrverandi venjarin hjá KÍ:

– Eg eri serliga væl nøgdur við, at vit kláraðu at skifta til fýra í verjuni á útivølli móti BK Häcken, og spæla 4-3-3. Eg ivist, um vit høvdu komið aftur í aftur, um vit ikki gjørdu tað. Tað er ein avgerð, sum eg eri serliga glaður fyri, sigur Magne Hoseth.

Eftir at hava spælt við fimm í verjuni móti ungarska Ferencvaros, og í fyrra dystinum móti BK Häcken, so satsaði Magne Hoseth alt í longdu leiktíðini og vann.

**“Hetta eru úrslit, sum eg væl síggi fyri mær, at føroysk lið kunnu klára javnan”**

Bæði Ferencvaros og BK Häcken vóru millum torførastu liðini í lutakastinum í innleiðandi umførunum í Champions League. Tað ger ikki bragdið minni gott, sigur Jákup Ósá, skrivari á Norðlýsinum og heimasíðuni bolt.fo.

– Virðið á hópinum hjá Ferencváros var 369 milliónir krónur. Tað er 18 ferðir virðið á hópinum hjá KÍ. Virði á hópinum hjá Häcken var 172 milliónir krónur. Virðið á KÍ var mett at verða um 20 milliónir krónur, sigur Jákup Ósá og siterar Transfermarkt.com.

Serliga er tað samlaði sigurin á Ferencvaros, sum vekjur ans.

– Úrslitini hjá Ferencváros vísa, at talan er um í serflokki besta liðið, sum nakað føroyskt felag hevur sent út úr altjóða kapping. So seint sum í 2022 vunnu teir sín bólk í Europa League móti liðum sum Monaco, Reyðu Stjørnu og Trapzonspor. Eftir tapið móti KÍ hava teir ongan altjóða dyst tapt av 12 í Conference League, sigur Jákup Ósá.

Harav vóru tveir dystir móti Fiorentina úr Italia. Næststørsta bragdið metur Jákup Ósa er samlaði sigurin á svenska meistaranum, BK Häcken.

– At KÍ megnaði at fremja bæði hesi úrslitini sama summar, sum eisini var krav fyri at koma í bólkaspælið, má í prosentum hava verið sera ósannlíkt frammanundan. Slík úrslit hava ongantíð áður verið bara nær við at hent síðani føroysk lið í 1992 á fyrsta sinni luttóku í altjóða kappingum, sigur Jákup Ósá.

## HETTA VERÐUR IKKI GERANDISKOSTUR

Tað verður mett sum ósannlíkt, at eitt føroyskt felag áhaldandi fer at vinna á slíkari mótstøðu, men tað er ikki vist, at lutakastið altíð kemur at hátta seg soleiðis.

– Vit hava sæð lið úr Íslandi, Estlandi, Lettlandi, Litava og Gibraltar, sum hava verið í bólkaspæli seinasta árini, men tey hava gjørt tað umvegis góð lutakøst og ein kappingarleist, sum gevur meistarum góðan møguleika til bólkaspæl, sigur klaksvíkingurin.

Hann vísur á Breiðablik úr Íslandi, Flora Tallinn úr Estlandi og Lincoln Imps úr Gibraltar, sum í hvør sínum lagi skuldu vinna tvær uppgerðir móti meistaraliðum, ið komu úr londum við somu ella nakað størri styrki.

– Hetta eru úrslit, sum eg væl síggi fyri mær, at føroysk lið kunnu klára javnan. Tað gingu 30 ár til vit sóu eitt slíkt bragd sum KÍ framdi í 2023, men vónandi ganga ikki 30 ár til vit síggja nakað slíkt aftur, sigur Jákup Ósá.

## KLAKSVÍKINGAR HAVA BETRI KORT ENN HINI

KÍ verður í 2024 styrkismett í 1. umfari Champions League. Hetta økir møguleikarnar fyri at vinna seg víðari úr 1. umfari rættiliga nógv. Og vinnur KÍ í 1. umfari í Champions League, so skal bara ein uppgerð av trimum afturat vinnast fyri at koma í eitt bólkaspæl. So á pappírinum er sannlíkt, at KÍ kemur aftur í bólkaspæl, um liðið kemur at luttaka í Champions League fleiri av komandi árunum.

– Fyri føroysku liðini í Conference League eru krøvini nógv hægri. Har skulu tríggjar ella fýra uppgerðir vinnast. Møguleikin økist, um liðini verða styrkimett og koma seinni inn í kappingina, men tað krevur framvegis eitt gott lutakast og helst eitt bragd, vísur Jákup Ósá á.

Kappingarleisturin hjá UEFA ger, at meistaraliðini hava nógv best møguleikar at vinna seg víðari. KÍ hevði bestu kortini á hondini av føroysku liðunum, men fekk eitt torført lutakast.

– Hóast KÍ vísti at tað ber til, so vænti eg ikki at tað verður gerandiskostur, at føroysk lið sama summar fara at senda tvey feløg á so høgum stigi úr Champions League ella aðrari kapping, sigur Jákup Ósá at enda.

KÍ vann í bólkaspælinum í UEFA Europa Conference League á NK Olympija Ljubljana úr Slovenia, og fekk javnleik móti franska stórfelagnum, Lille.

# SPENNANDI TÍÐ FYRI FRAMMAN

*Eftir eitt ár í 1.deild er mansliðið hjá Skála ÍF aftur í Betri Deildini. Teir vóru sannførandi farna kappingarár, og endaðu heili 13 stig frammanfyri grannarnar hinumegin fjørðin. Samstundis eru kvinnurnar eisini í Betri Deildini – hesaferð sum Skála ÍF og ikki sum EB/Streymur/Skála*

Eitt, sum er broytt síðani Skála seinast var í Betri Deildini er, at felagið hevur fingið nýtt búmerki og slagorð.

## MÁL EFTIR MÁL

Á eykaaðalfundi í mars 2023 varð øll nevndin skift út. Nýggja nevndin ynskti at byggja víðari á góða arbeiðið, sum undanfarna nevnd hevði gjørt.

Jóannes Prestá er nýggjur formaður í felagnum.

– Vit fóru í eina tilgongd at gera eina strategi, sum vit kalla okkara stavnhald. Vit settu orð á eina nýggja missión, visjón og virði hjá Skála Ítróttarfelag. Afturat hesum valdu vit eisini at kunngera eitt nýtt búmerki og slagorð. Við hesum vóna vit at markera eina nýggja kós fyri felagið, har vit byggja víðari uppá góða arbeiðið, ið er gjørt seinastu árini og eisini seta okkum nýggj mál – Mál eftir mál.

## EINGIN SKAL FÁA TAÐ LÆTT TÁ TEY VITJA UNDIR MÝRUHJALLA

Tað sigur Pauli Poulsen, sum aftur í ár stendur á odda fyri besta mansliðnum hjá Skála. Teir vunnu 1. deild sera sannførandi í fjør, og í Skála hava tey havt eina greiða ætlan.

– Í okkara tilgongd til kappingina í 2023 byrjaðu vit við at broyta tilgongdina til venjing. Hetta fevndi eisini um umstøðurnar viðvíkjandi útbúnaði og við skikkaðum venjarum um besta liðið.

– Broytingar taka tíð, men hetta er ein tilgongd, sum vit byggja víðari uppá í 2024, sigur Pauli Poulsen, sum aftur gjørdist venjari hjá Skála í 2023. Hann var eisini venjari í felagnum frá 2014 til 2017.

– Vit arbeiða við, at liðið skal spæla skjótan og tekniskan fótbólt, við leikarum, sum arbeiða hart allar 90 minuttirnar í hvørjum dysti.

– Ein greiður partur av okkara málsetningi er, at eingin, sum kemur á okkara heimavøll at spæla, skal fáa tað lætt. Vit koma at leggja nógv fyri, tá ið dystir eru undir Mýruhjalla.










*Pauli Poulsen, Skála-venjari*

Tá Skála í fjør spældi í næstbestu deildini, var tað við leikarum, har størsti parturin vóru ungir lokalir leikarar. Felagið hevur eina greiða framtíðarætlan, og í Skála Ítróttarfelag trúgva tey uppá, at miðvísa ungdómsarbeiðið fer at bera frukt.

– Ungdómsarbeiðið á Skála hevur verið gott í nógv ár. Tað eru nógvir ungir, evnaríkir leikarar á Skála, og fyri at hesir skulu mennast, so skulu vit eisini hava drivi til at geva ungum leikarum møguleikan at sleppa at spæla.

– Leikararnir eru léttir á fótum, og eru skúlaðir til skjótan tekniskan fótbólt. Í hesum er ein greið menningarætlan løgd, har vit á hvørjum ári skulu byggja uppá, soleiðis, at leikararnir og liðið mennast tekniskt, taktiskt og fysiskt fyri hvørt ár. Vit arbeiða eftir leistinum mál eftir mál, sigur Pauli at enda.

## EGIÐ LIÐ HJÁ BÆÐI KVINNUM OG MONNUM

Kvinnurnar á Skála hava síðani 2013 samstarvað við EB/Streym um lið í bestu deildini, har tær bæði hava vunnið føroyameistaraheitið og steypakappingina. Men í 2024 verður tað ikki sum felagslið, at skálakvinnur luttaka.

***“Við egnum kvinnuliði kunnu vit fáa enn fleiri í nærumhvørvinum at luttaka”***

– Vit hava havt eitt gott samstarv við EB/Streym um felagslið í kvinnudeildini, har vit hava fingið góð úrslit. Vit hava eftirmett og hugt nærri eftir málum fyri kvinnufótbóltin, og tað er sum liður í hesum, at vit hava gjørt av, at aftur skipa egið kvinnulið, greiðir Jóannes Prestá frá, sum samstundis vónar, at tey við egnum kvinnuliði kunnu fáa enn fleiri í nærumhvørvinum at luttaka.

Slagorðið sigur mál eftir mál. Og í tí liggur, at felagið setur sær mál, og tá eitt mál er rokkið, so verða nýggj mál sett. Jóannes og hini í Skála hava eisini sett sær mál fyri kvinnufótbóltin í felagnum.

– Fyrsta málið er at syrgja fyri, at kvinnurnar í nærumhvørvinum eisini fáa eitt gott tilboð. Hetta er í samsvar við endamálið hjá Skála Ítróttarfelag, tí í viðtøkunum stendur, at “høvuðsendamál felagsins er at vekja ans og áhuga fyri ítrótti. At fremja og leggja til rættis ítróttarvirksemi”, sigur formaðurin, og leggur afturat, at hetta er fyrstu ferð síðani 2008, at Skála ÍF hevur egið lið í bestu deildunum hjá bæði monnum og kvinnum.

Sveinur Ellefsen er settur sum venjari hjá kvinnunum. Annars er liðið mannað av nógvum ungum leikarum, umframt royndum og eldri leikarum, sum hava funnið gaggurnar framaftur.








# NIÐURFLYTING SKAL IKKI ENDURTAKA SEG









*Tað kom illa við hjá NSÍ, at besta mansliðið hjá felagnum í 2022 flutti niður úr Betri Deildini. Nú hevur felagið spælt seg uppaftur í bestu deildina, og formaðurin í NSÍ sigur, at niðurflytingin skal ikki endurtaka seg*

Karstin Joensen greiðir frá, at tá ið hann og onnur komu í nevndina í NSÍ, var liðið longu flutt niður, og tey valdu tí at hyggja eftir øllum felagnum, tá ið tey komu til.

– Tað nyttaði einki at gráta um, at man var fluttur niður. Tað snúði seg bara um at arbeiða seg uppaftur. Tey flestu høvdu ikki væntað, at vit fóru at flyta niður, men vit vóru snøgt sagt ikki góðir nokk. Vit valdu tí at hyggja eftir øllum felagnum, og hvar vit skuldu leggja størstu orkuna, greiðir hann frá.

Sjálvur er hann ikki í iva um, at liðið má byggjast á tað lokala tilfeingi í økinum.

– Men vit noyddust at staðfesta, at tá ungómsarbeiðið hevði svikið í nøkur ár, so var tilgongdin á besta liðið ikki beint har, og tí máttu vit styrkja okkum, sigur formaðurin.



*Karstin Joensen, NSí-formaður*

## TEIR LOKALU VÓRU TRÚFASTIR

Karstin Joensen sigur, at nevndin tók eitt prát við spælararnar, og tað var lættari enn væntað at fáa teir at trúgva upp á projektið hjá nýggju nevndini við at fáa liðið upp aftur í fremstu røð.

– Teir vóru sinnaðir at taka eitt tak fyri felagið. Vit høvdu lært, at um man ikki er klárur, so er niðurflyting ein møguleiki, og tað er eingin loyna, at felagið steindoyr, um man ikki hevur lið í bestu deildini. Tí er niðurflyting ikki ein møguleiki longur, sigur formaðurin í NSÍ.

Karstin Joensen leggur afturat, at umframt at lokalu leikararnir vóru trúfastir, so vóru lokalu stuðlarnir eisini trúgvir móti felagnum.

– Vit mistu nógvan uppbakning av stuðlum uttan fyri Runavík. Men eg merkti øgiliga væl, at lokala umhvørvi her á staðnum stóð saman um at fáa okkum uppaftur. Okkara góðu og trúgvu stuðlar eru eisini rundan um okkum í dag, sum eisini vóru við, tá ið vit fluttu niður. So vit hava havt dyggan stuðul hesa tíðina, sigur Karstin Joensen.

## KVINNURNAR VÓRU SÓLSKINSSØGAN

Meðan árið í fjør var tungt á manssíðuni, so var støðan ein onnur á kvinnusíðuni. Kvinnurnar hjá NSÍ gjørdust nevnliga steypavinnarar og endaðu næstfremst í landskappingini.

– Kvinnurnar gjørdu tað framúr í fjør, og vit høvdu eisini eitt U17 dreingjalið, sum kom í steypafinaluna. So tað var gleðiligt, sigur Karstin Joensen.

Spurdur um málsetningin fyri 2024 sigur formaðurin í NSÍ:

– Ynski hjá okkum yvirskipað fyri komandi ár er, at vit á ungdómssíðunum síggja, at góða framgongdin stendur við. Á vaksnamannasíðuni skulu vit betra okkum. Kvinnurnar kunnu bara betra seg eitt pláss, men menninir skulu etablera seg í bestu deildini, sigur formaðurin í NSÍ, Karstin Joensen at enda.

Fyrsti dysturin hjá monnunum í Betri Deildin verður sunnudagin 10. mars, á útivølli móti HB. Kvinnurnar leggja fyri týsdagin 26. mars, tá tær fáa vitjan av Skála.

## ARBEIÐA MIÐVÍST VIÐ UNGDÓMINUM

Fyri góðum ári síðani tók nýggj nevnd við í NSÍ, og nýggja nevndin hevur lagt sera stóra orku í at menna ungdómsfótbóltin í felagnum.




Í nógv ár hevur fótbóltsfelagið í Runavík verið ein maktfaktorur í ungdómsfótbólti, ikki minst á dreingjasíðuni, men seinnu árini hevur tað tykist sum um, at ungdómsliðini hjá NSÍ ikki hava staðið seg eins væl sum áður.

Men nú er ungdómsfótbólturin í Runavík aftur við at fóta sær, og sambært formanninum í felagnum, Karstin Joensen, leggur leiðslan í NSÍ sera stóran dent á ungdómsarbeiðið, og ikki minst at ungdómsliðini hava skikkaðar venjarar.

– Tá vit sum nevnd komu til fyri góðum ári síðani, broyttu vit bygnaðin í felagnum til at hava fleiri undirnevndir, millum annað eitt ungdómstoymi, og ikki bara eina starvsnevnd. Vit leggja øgiligа stóran dent á nú, at vit hava eitt vælvirkandi ungdómstoymi, sum tekur sær av at hava skikkaðar venjarar til øll. Tí vit arbeiða fram ímóti at koma aftur har, sum vit vóru í stórheitstíðini, sigur formaðurin í NSÍ.

Karstin Joensen leggur afturat, at hann er í tí hepnu støðu, at hann kann ikki siga so nógv um fortíðina, tí hann er so mikið nýggjur í leiðsluni í NSÍ.

– Men nøkur skeiv ting eru gjørd og tí hyggja vit bara frameftir nú, sigur formaðurin.

## FLEIRI HERÐAR BERA FELAGIÐ

Umframt at hava eitt vælvirkandi ungdómstoymi, hevur NSÍ eisini fleiri aðrar undirbólkar, og tað hevur við sær, at tað í dag eru fleiri herðar, sum bera felagið.

– Herfyri høvdu vit eitt tilmeldingartiltak í Bylgjuni, har eini 500 fólk møttu upp. Ungdómstoymið tók sær av øllum í hesum sambandi, greiðir formaðurin frá.

Hann leggur tó afturat, at starvsnevndin í NSÍ hevur limir í øllum undirbólkunum, so man alla tíðina er dagførdur um, hvat gongur fyri seg.

– Men hetta er ein roynd at leggja uppgávur út á fleiri herðar, og í dag eru tað eini 30-40 herðar, sum bera NSÍ. Tí blívur tað nógv lættari hjá okkum í starvsnevndini at hugsavna okkum um tað, sum vit skulu taka okkum av, sigur Karstin Joensen.

Harumframt hevur NSÍ eisini sett eitt fólk í fulltíðarstarv, og tað lættir eisini um.

– Fyri einum ári síðani bleiv Jákup Mortensen settur sum høvuðsungdómsvenjari eftir skúlatíð, meðan hann las til lærara. So tók hann útbúgving sum lærari, og vit høvdu brúk fyri honum. Tí bleiv hann settur í fulla tíð, har hann tekur sær av umsiting, samskipan og øðrum um dagin, samstundis sum hann er høvuðsungdómsvenjari seinni á degnum, greiðir Karstin Joensen frá.

> ***"Runavíkar kommuna er ein góður viðspælari hjá okkum upp á allar mátar. Hon er heilt greitt okkara størsti stuðul"***

## TRÝST Á KARMARNAR

Sum heild lata tey í NSÍ væl at kørmunum við Løkin, men formaðurin í NSÍ dylur ikki fyri, at tað er eitt øgiliga stórt trýst á vøllin við Løkin, og at tað kann vera trupult at finna venjingartíðir til øll.

– Tað hevði einki gjørt, um vit høvdu ein vøll afturat í Runavík, men vit skulu ikki klaga, sigur formaðurin.

Felagið arbeiðir í løtuni eisini við at fáa eitt NSÍ-hús, og tað nærkast alsamt.

– Húsið er staðsett sunnanfyri vøllin, og grundin er stoypt. Yvirtromin skal reisast í næstum, og so er ætlanini, tá ið tað er klárt, at vit flyta meginpartin av felagnum yvir í nýggja húsið. Tó vera menninir verandi eftir í kjallaranum í høllini, men vit royna at savna felagsskapin, sigur Karstin Joensen.

Formaðurin í NSÍ sigur, at karmarnir hava leingi verið avbjóðandi, men hetta er ikki nakað, sum hann vil lasta kommununi fyri.

– Runavíkar kommuna er ein góður viðspælari hjá okkum upp á allar mátar. Hon er heilt greitt okkara størsti stuðul, sigur formaðurin í NSÍ.






RUNAVÍK 477272 • KLAKSVÍK 455149 • TÓRSHAVN 350500 • WWW.BORG.FO



*Allan Smedemark,*
*formaður í nevndini fyri kvinnufótbólt í TB*




*– Tær hava verið ótrúliga hugagóðar at vant í vetur, samstundis sum fleiri og fleiri kvinnur leggjast aftur at fótbóltinum í Suðuroynni, sigur Allan Smedemark*

# VILJA RØKKA HÆGRI MÁLUM

*Samstarvið millum TB, FC Suðuroy og Royn um kvinnufótbólt í Suðuroynni heldur fram, og aftur í ár eru tær til reiðar at dystast í fremstu deildini. Gamaní hevur tað verið strævið farnu árini, men tað er av stórum týdningi, at kvinnuliðið í oynni ikki dettur niður fyri*

Meðan tey trý feløgini arbeiða við at seta venjara til kvinnuliðið, hava teir báðir, Markus Thorberg og Gilli Sørensen, tikið sær av venjingunum í uppstartinum til komandi kappingarár.

– Tær hava verið ótrúliga hugagóðar at vant í vetur, samstundis sum fleiri og fleiri kvinnur leggjast aftur at fótbóltinum í Suðuroynni. Og hetta er sjálvandi ein uppgáva, ið vit taka í størsta álvara, tí tað ræður eisini um at geva kvinnunum góðar karmar, sigur Allan Smedemark, ið er formaður í nevndini fyri kvinnufótbólt í TB.

**“Nýggi kappingarleisturin, við grundspæli og endaspæli kann gerast partur av menningini”**

Kappingin í ár er tann triðja upp í slag fyri TB/FCS/Royn, og hóast tað onkuntíð hevur sæð rættuliga møtumikið út á vøllinum, hava Allan og kvinnurnar trúnna upp á, at tað ber til at gera tað betri í ár, samanborið við seinastu tvey kappingarárini, og harvið koma eitt sindur longri upp á stigatalvuni, sum er eitt av málunum í 2024.

Fyri tveimum árum síðani endaðu kvinnurnar hjá TB/FCS/Royn aftast í landskappingini við ongum stigi, meðan tað í fjør hilnaðist eitt sindur betri, og tær fingu 4 stig. Stigini vórðu vunnin eftir fýra javnleikir, sum komu í hús ímóti EBS/Skála, Víkingi og tvær ferðir móti 07 Vestur.







– Vit hopa og vóna, at tær kunnu gera tað eitt sindur betri í ár. Tað er so einki at ivast í, at viljin er til staðar, samstundis sum vit hava nógvar evnaríkar spælarar, ið manna liðið. Tað ræður um at fáa tað at koppa okkara veg, so fer at ganga. Vit arbeiða fyrst og fremst við at menna liðið og hvønn einstakan leikara. Men vit mugu hava tol, tí sovorði tekur tíð.

– Í fjør fingu tær fýra javnleikir, men høvdu vit nú klárað at vunnið hesar dystir, umframt at fingið onkran javnleik afturat, so eru vit á góðari leið. Harafturat vænti eg eisini, at nýggi kappingarleisturin, við grundspæli og endaspæli kann gerast partur av menningini hjá hesum liðnum, sigur ein vónrikur Allan Smedemark at enda.

Ársins fyrsti dystur hjá TB/FCS/Royn verður á útivølli ímóti Víkingi mikudagin 27. mars.






# EIN NÝGGJ TÍÐ HJÁ SANDOYINGUM

*Tað er eitt serligt kappingarár, ið stendur fyri framman hjá B71, nú kappingin 2024 fer í gongd. Nýggja fasta sambandið um Skopunarfjørð gevur fótbóltsfelagnum í Sandoynni heilt nýggjar møguleikar, og formaðurin í B71, Karl Vidtfeldt, er sera spentur uppá, hvussu alt fer at laga seg*

## ALT VERÐUR NÓGV LÆTTARI

– Áðrenn fasta sambandið kom, skuldi alt tilllagast ferðaætlanini hjá Teistanum, men tað sleppa vit undan at hugsa um nú. Hetta ger tað so nógv lættari, og eg merki eisini sjálvur, at tað er sum um, at døgnið er longt við tveimum tímum, nú vit hava fingið fast samband, sigur Karl Vidtfeldt.

Formaðurin leggur afturat, at tey eru sera fegin um tunnilin, ikki minst tí tað ger tað so nógv lagaligari hjá teimum at sleppa av oynni at spæla dystir og hjá vitjandi liðum at koma í Sandoynna at spæla.



*Karl Vidtfeldt, B71-formaður*

– Nú fer ikki allur dagurin, tá ið man skal av oynni at spæla, og tað er ein ótrúliga stór broyting fyri okkum. Tað ger eisini, at tað verður eitt nógv størri nøgdsemi allan vegin ígjøgnum, sigur formaðurin í B71.

Hann vísir tó á, at sjálvandi hevur tað ein meirkostnað við sær, at man nú skal við bili gjøgnum tunnilin ístaðin fyri bátinum, men tann kostnaðin tekur man sjálvandi við, og tað ræður tí eisini um at fylla bilarnar, tá ið farið verður av oynni fyri at tað skal vera so fíggjarliga skynsamt sum gjørligt.



Ein onnur avbjóðing, sum tey í B71 hava stríðst við í nógv ár, men sum nú fer í søguna, tí tunnilin er komin, er avmarkaða tíðarskeiðið, har man kundi leggja dystir á heimavølli.

– Tað var mangan trupult fyrr at áseta dystartíðspunkt, tí man altíð skuldi taka hædd fyri ferðaætlanini hjá Teistanum. Men tað er ein farin tíð, og tað ger tað rættiliga nógv lættari hjá okkum, sum vara av felagnum, sigur Karl Vidtfeldt.

Formaðurin í B71 er sannførdur um, at man enn ikki veruliga sær, hvussu stóra jaliga ávirkan Sandoyartunnilin kemur at hava á fótbóltin í oynni.

> **“Áðrenn fasta sambandið kom, skuldi alt tilllagast ferðaætlanini hjá Teistanum”**

## LETUR UPP FYRI SAMSTARVI

Ein annar møguleiki, sum gerst nógv meiri realistiskur við Sandoyartunnilinum, er samstarv við onnur feløg.

– Vit vilja fegin samstarva við onnur feløg um lið og árgangir, har sum vit ikki sjálvi megna at manna lið. Sum nú er, hava vit gjørt avtalu við AB um eitt felagslið hjá U17 dreingjum. Vit hava samstarvað við AB um felagslið áður, og tað hevur riggað væl, og vit tosa eisini um aðrar møguleikar.

– Tá vit samstarvaðu fyrr á kvinnusíðuni, var ein avbjóðing, at tað kundi vera møtumikið hjá argjagentum at koma suður at venja ella spæla, og tað kanska var ófantaligt veður at sigla, men tann forðingin er burtur nú, sigur Karl Vidtfeldt.






Harafturat hevur formaðurin í B71 eisini lagt til merkis, at tað eru alsamt fleiri ungir leikarar, sum hava spurt seg fyri um møguleikan fyri at koma suður at spæla við B71.

– Tað er fyrst og fremst leikarar, sum hava tilknýti til oynna. Tí tað er so nógv lagaligari nú at koma suður at spæla, sigur hann.

### FÓLK ERU RØSK AT HJÁLPA TIL

At reka felagsskapin B71 krevur eisini sítt, men Karl Vidtfeldt sigur, at tað hevur gingið støðugt framá við at fáa fólk í oynni at taka ein hond í fyri at hjálpa felagnum.

– Men felagið veksur støðugt, og tí krevur tað eisini meira og meira orku, sigur hann.

Eitt stórt framstig fyri B71 var tí at fáa sett ein samskipara fulla tíð.

– At Fótbóltssamband Føroya gjørdi tað møguligt at fáa stuðul til fulltíðarsettan samskipara, gjørdi at tað bar til hjá okkum, og tað hevur gjørt sera stóran mun. Eg haldi sjálvur, at tað er eitt tað besa, sum FSF hevur gjørt fyri feløgini. Áðrenn hekk tað á nøkrum fáum herðum, sum skuldu gera tað eftir arbeiðstíð, sigur Karl Vidtfeldt at enda.



**“Áðrenn vit vita av, so eru vit í Betri Deildini aftur”**

### SANDOYGGIN HEVUR FLEIRI LANDSLIÐSLEIKARAR

Ungdómsfótbólturin í Sandoynni stendur í blóma, og gongdin er so mikið góð, at B71 kann breggja sær av, at hóast oyggin ikki er so øgiliga stór, so hevur felagið lið í øllum aldursbólkum á ungdómsøkinum.

Formaðurin í B71, Karl Vidtfeldt, sigur, at ein orsøk er ivaleyst, at man hevur næstan óavmarkaða vallartíð, umframt at man hevur atgongdt til ítróttarhøllina, sum liggur beint við síðuna av vøllinum, so venjingarumstøðurnar eru sera góðar.

– Men so er tað eisini umráðandi hjá teimum ungu, at tey hava fyrimyndir, sum onkursvegna hava slóðað fyri og víst, at tað ber til at vaksa upp í felagnum hjá okkum og røkku ovastu tindunum í føroyskum fótbóltshøpi, sigur Karl Vidtfeldt.

Hann vísir í hesum sambandi á Brand Hendriksson Olsen og Pætur Petersen, sum báðir eru skálvíkingar og uppvaksnir í B71, og sum í dag eru fastir fúsir í føroyska landsliðshópinum hjá monnum, og eisini vísir hann á Fridrikku Clementsen, sum er fastur partur av kvinnulandsliðnum.

– Tey eru sjálvandi fyrimyndir hjá teimum ungu, og til dømis hava vit eitt fast tiltak um ársskiftið, sum eitur nýggjársfótbóltur, og tá plaga tey at vera við, um tað liggur fyri, og tað vóru tey seinast. Tað hevur nógv at siga fyri okkara ungu, sigur formaðurin í B71.

Harafturat eru eisini fleiri leikarar úr B71, sum eru á ymsu ungdómslandsliðunum, og formaðurin dylur ikki fyri, at tað kann røkka langt hjá felagnum.

– Áðrenn vit vita av, so eru vit í Betri Deildini aftur. Tað er so upp á sigt málsetningurin, sigur Karl Vidtfeldt.



Hilton Garden Inn™
Faroe Islands

Altjóða støði.
Serstakt útsýni.

Hilton Garden Inn Faroe Islands er samantvinningin av norðurlendskum marglæti og føroyskum hugna.

Gist hjá okkum og fá góðsku, tænastu og gestablídni á heimsstigi.

Staravegur 13, Tórshavn www.hilton.fo



HALLARTÚN



BISTRO & BARR
Í HILTON GARDEN INN

Við besta útsýni yvir grøna beltið í Hoydølum, liggur eitt upplivilsi vert at vitja.

Vit borðreiða til tey gomlu og tey ungu, til góman og til tungu, við allarbestu føroysku rávørunum.

Bílegg borð á www.hallartun.fo

# VILJA BJÓÐA KVINNUM EITT SERIØST TILBOÐ

*Fyri fyrstu ferð nakrantíð fer FC Hoyvík at hava eitt lið í fremstu deildini hjá kvinnum. Hetta er eitt neyðugt stig at taka, sigur formaðurin í felagnum, sum leggur dent á, at man vil bjóða kvinnunum eitt seriøst tilboð*

Eitt nýtt lið verður partur av fremstu kappingini hjá kvinnum í ár, og tað er FC Hoyvík. Fyri kvinnufótbóltin er hetta gleðiligt, og stendur tað til formannin í FC Hoyvík, so verða hoyvíkskvinnur partur av toppinum av føroyskum kvinnufótbólti um nøkur ár.

### EITT NEYÐUGT STIG

Fróði Danielsen, formaður í FC Hoyvík, sigur, at tað var ein neyðug avgerð hjá felagnum at fara undir kvinnufótbóltin.

– Tað kom soleiðis í lag, at tað var neyðugt hjá okkum at taka hetta stig, tí vit hava so ekstremt nógv leikaratilfeingi hjá gentunum, so um vit ikki gjørdu hetta, so var vandi fyri, at nógvar teirra fóru úr felagnum, sigur hann.

Fróði greiðir frá, at tey í FC Hoyvík vistu, at tað var høgur kvalitetur á nógvum av ungu leikarunum.

– Tí kallaðu vit inn til fund, har vit greiddu frá ætlanunum um at melda lið til kvinnukappingina, um tær vóru við uppá tað. Tær tóku allar undir við uppskotinum um at fara uppí, so vit meldaðu liðið til, sigur Fróði Danielsen.


*Fróði Danielsen, FCH-formaður*

### NÓGV GOTT TILFAR Á VEG

– Vit eru fullvæl greið yvir, at tað verður tungt í byrjanini hjá okkum, tí hetta er nakað nýtt, og vit hava eitt rættiliga ungt lið. Tað eru sjálvandi fólk, sum ivast í, um hetta er nakað, ið skal takast seriøst, men tað er tað. Hetta er tað, sum vit gjarna vilja í FC Hoyvík, sigur formaðurin í felagnum.

Hann sigur, at um man hugsar tvey ár fram í tíðina, so sær tað ógvuliga gott út, tí felagið hevur sera nógvar góðar ungar leikarar á veg fram á gentusíðuni.

– Eg eri ikki eina løtu í iva um, at kvinnufótbólturin kemur at blóma í Hoyvík, og hann ger tað í veruleikanum longu nú á gentusíðuni. Til dømis vunnu U13 genturnar hjá okkum greipuna í fjør, sigur Fróði Danielsen.

### SKULU BYGGJA NAKAÐ UPP

Formaðurin í FC Hoyvík sigur, at man í felagnum er avgjørdur um, at hetta við at hava eitt kvinnulið er nakað, sum man skal byggja upp, og at tað tekur tíð.

– Leiðslan í felagnum er púra samd í hesum, og man bakkar 100 prosent upp um hetta projektið, og eg ivist ikki í, at vit eru klár, tá ið kappingin byrjar, sigur Fróði Danielsen.

Hann sigur víðari, at áhugin fyri at vera við á kvinnuliðnum er støðugt vaksandi, og talið av leikarum, ið eru møttir til venjing, er nøktandi.






*Zoran Vujovic, venjari hjá FCH-kvinnum*

– Vit taka tað róligt, sum nú er. Men hugburðurin her í felagnum er, at tað skal ikki vera nakar sum helst munur á tilboðnum, sum vit hava til besta manslíðið og besta kvinnuliðið hjá okkum. Vit skulu bjóða eitt heilt seriøst kvinnutilboð, tí fyri okkum er tað ógvuliga umráðandi, at vit vísa ungdómsleikarunum, at vit meina tað í álvara, sigur formaðurin í FC Hoyvík.

Fróði Danielsen er eisini rættiliga sannførdur um, at FC Hoyvík fer at mynda kvinnufótbóltin í framtíðini.

– Eg síggi fyri mær, at um nøkur ár eru vit í toppinum av føroyskum kvinnufótbólti og blíva verandi har, sigur hann.

At standa á odda fyri nýggja kvinnuliðnum hjá FC Hoyvík hevur felagið sett serban Zoran Vujovic, sum á fyrsta sinni skal standa á odda fyri einum liði í vaksnamannadeildini. Hann hevur annars drúgvar royndir sum ungdómsvenjari. Harafturat hevur felagið eisini sett bæði hjálparvenjara og málmansvenjara til kvinnuliðið í Hoyvík.

## VILJA MENNA EITT VENJARAUMHVØRVI

Tað vera tvær venjaralegendur, sum koma at standa á odda fyri besta mansliðnum hjá FC Hoyvík komandi kappingár. Felagið hevur nevnliga sett Bill McLeod Jacobsen sum høvuðsvenjara, og Heðin Askham sum hjálparvenjara.

– Tað er einki at ivast í, at vit halda, at tað sær spennandi út við monnunum í ár, nú vit hava fingið tvær legendur at standa á odda fyri liðnum, sigur Fróði Danielsen.

> **“Vit skulu gera tað lokkandi hjá venjarum at koma í okkara felag at virka”**

Formaðurin í FC Hoyvík sigur, at man í felagnum nú velur at leggja dent á, at man skal byggja upp eitt venjaraumhvørvi í Hoyvík.

– Vit skulu gera tað lokkandi hjá venjarum at koma í okkara felag at virka sum venjarar, sigur hann.

## EITT FELAG

Sambært formanninum í FC Hoyvík hevur ein avbjóðing í felagnum verið, at tað hevur verið ein ov stór gjógv millum ungdómsfótbóltin og vaksnamannadeildina í felagnum.

– Tí skulu vit nú byggja eina brúgv millum hesar partar av okkara virksemi, tí tað hevur manglað, serliga á manssíðuni. Á kvinnusíðuni er støðan ein onnur, sigur Fróði Danielsen, og vísir í hesum sambandi á, at tað hevur verið eitt sindur avbjóðandi við liðunum í U17 og U21 kappingini á manssíðuni, men hetta skal takast í størri álvara í ár.

– Nú hevur tað verið friður í allan vetur til fyrireiking, og eg haldi, at man nú endiliga – eftir samanleggingina við Undrið í fjør – sær aftur, at talan er um eitt felag, sigur Fróði Danielsen.

## KARMARNIR ERU OV TRONGIR

Tað er ikki so langt síðani, at FC Hoyvík fekk sett upp nakrar barakkir til felagshús, og tað var eitt stórt framstig.

– Tað gjørdi, at umstøðurnar blivu nógv betri, enn tær vóru. Men vit eru langtsíðani vaksin úr teimum umstøðum, sum vit eru í. Vit hava eitt tætt samskifti við Tórshavnar kommunu um hetta, tí felagið hevur næstan 400 ungdómsleikarar, og tað legst alla tíðina afturat, so vit eru eitt stórt felag, sum hevur sína basu í einum øki, sum stendur í støðugum vøkstri, sigur formaðurin í FC Hoyvík.





Eyðun Klakstein, U21-venjari

# Siktar eftir stiga-metinum

*Tveir sigrar og ein javnleikur góvu U21-landsliðnum við monnum sjey stig í fjør í hálvrunnari EM-undankapping. Eyðun Klakstein og hansara menn eru kortini ikki nøgdir og sikta í ár eftir stigametinum*

*Hvussu nógv stig skulu tit hava í ár?*

Tað er sjáldan at ein slíkur spurningur verður møttur við einum serliga ítøkiligum svari. Tað verður hann kortini hesaferð, og venjarin hjá U21-landsliðnum skákar sær ikki undan yvirhøvur.

– Eg verði ikki nøgdur, um vit ikki leggja stig afturat hasum sjey. Gera vit tað og koma upp á 10 ella 11, so er tað absolutt góðkent, men tað stóra málið er at raka 12, sigur Eyðun Klakstein.

EM-undankappingin byrjaði við einum vónbroti í juni, tá tað bert eydnaðist at fáa eitt stig ímóti Andorra á Djúpumýru í Klaksvík, men tá elsta ungdómslandsliðið seinni vann á útivølli ímóti bæði Hvítarusslandi og Andorra sá straks betri út, og fimm stig upp á fimm dystir í 2024 ljóðar ikki ósannlíkt.

– Tað er eitt øgiliga ambitiøst mál hjá einum føroyskum landsliði. Vit mangla fýra stig upp til metið, men vit ætlaðu at taka tað. Tað krevur antin tveir sigrar ella ein sigur og tveir javnleikir, og tað er ikki lítið. Men tað er framvegis okkara mál.

***“Koma vit upp á 10 ella 11 stig, so er tað absolutt góðkent, men tað stóra málið er at raka 12”***

## GOTT ÁR Í VENJARASESSINUM

Tað er ikki meir enn eitt ár síðan, at Eyðun Klakstein setti seg í U21-venjarasessin. Hann loysti av fyri Sámal Erik Hentze, sum hevði fingið góð úrslit frammanundan, men nýggi maðurin hevur livað upp til krøvini – eisini síni egnu.

Eyðun Klakstein hevur verið venjari fyrr. Eitt skifti var hann venjari hjá KÍ, seinni førdi hann B36 til føroyameistaraheitið. Í landsliðshøpi hevur klaksvíkingurin vant yngri landslið, men hetta er fyrstu ferð, hann stendur á odda fyri U21. Ein serstakur og hugaligur aldursbólkur at arbeiða við, heldur Eyðun Klakstein.

– Eg havi nokkso nógvar royndir við yngri landsliðum, men U21 er øðrvísi. Í fótbóltshøpi er talan um vaksnar spælarar, sum eru á veg fram, greiðir hann frá.

– Hetta eru góðir spælarar. Teir eru væl fyri og hugaðir at læra, at spæla saman og at vera eitt lið, so uppgávan er rættiliga hugalig.

## BYRJA VIÐ PORTUGAL

Er eitt land, sum Føroyar klárar seg serliga illa ímóti, er tað kanska Portugal. Nógv minnast frálíka liðið við Cristiano Ronaldo á odda, sum vitjaði og vann 6-0 á Tórsvølli í 2016, og fer ein í søgubøkurnar eru fleiri líknandi úrslit at finna.

Hetta U21-landsliðsárið byrjar 2024 júst í Portugal, og Eyðun Klakstein er fullgreiður yvir, at uppgávan 21. mars er stór.

– Portugal tykist vera sterkasta liðið í bólkinum og er eisini styrkismett ovast, hóast Grikkaland vann á teimum í fjør. At spæla á útivølli ímóti portugisum man vera truplasti dysturin í hesum bólkaspælinum, so tað er ein øgiliga stór uppgáva, vit fáa beinanvegin, men hana skulu vit eisini royna at loysa, sigur Eyðun Klakstein, sum gleðir seg til at royna styrki ímóti iberunum.

Í heyst eru írestandi fýra dystirnir á skránni, sum eru ímóti Kroatia (ú), Grikkaland (h), Portugal (h) og Hvítarussland (h), og venjarin hevur serliga gott eyga á tveimum av heimadystunum.

– Eg meti, at vit hava størstar møguleikar í heimadystunum, sum koma í heyst. Hvítarussland er tað landið, sum er styrkismett okkum næst, og vit hava longu vunnið á teimum. Síðan er tað Grikkaland, sum er triðbesta liðið í bólkinum. Annars hava vit fyrr sæð, hvat U21-landsliðið kann gera á einum góðum degi.

### U21-landsliðið skrá 2024

| | | |
|---|---|---|
| 21. mars | U21 | Portugal – Føroyar (EM 2025) |
| 5. septembur | U21 | Kroatia – Føroyar (EM 2025) |
| 10. septembur | U21 | Føroyar – Grikkaland (EM 2025) |
| 11. oktobur | U21 | Føroyar – Portugal (EM 2025) |
| 15. oktobur | U21 | Føroyar – Belarus (EM 2025) |

# TRYGGJA FRAMTÍÐAR-FÓTBÓLTIN Í KLAKSVÍK

*Akademiið hjá KÍ skal saman við góða fíggjarliga úrslitinum hjá KÍ vegna europeisku luttøkuna í fjør leggja lunnar undir framtíðarfótbóltin í Klaksvík. Tað sigur formaðurin í Klaksvíkar Ítróttarfelag, Tummas Lervig, sum heldur tað vera týdningarmikið, at felagið hevur nakrar fastar karmar at arbeiða undir*

KÍ og Klaksvík hava í stóran mun myndað føroyskan fótbólt seinastu árini. Bæði á kvinnu- og mannfólkasíðuni hevur KÍ verið nógv tað mest vinnandi felagið seinastu árini. Men meðan kvinnurnar fyrst og fremst hava verið mannaðar av lokalum leikarum, so hevur tað verið heldur soltið við tilgongdini av lokalum leikarum á besta mansliðið. Men leiðslan í KÍ vónar, at KÍ-akademiið skal gera mun á hesum øki.

## EIN NATÚRLIG FÓÐURLINJA TIL BESTU LIÐINI

Tummas Lervig er formaður í KÍ, og hann greiðir soleiðis frá, um hugsanina aftan fyri KÍ-akademiið:

– Tankin var fyrst og fremst, at akademiið skuldi leggja lunnar undir framtíðarfótbólt í Klaksvík. Hetta er ein háttur at tryggja ungdómsdeildirnar hjá okkum, og yvirskipaða málið er at gera ein felags spælistíl fyri øll liðini hjá okkum. Akademiið er eitt tilboð til bæði gentur og dreingir, og vit ímynda okkum, at tað í framtíðini skal vera ein natúrlig fóðurlinja til bestu liðini hjá okkum, sigur Tummas Lervig.

At KÍ-akademiið hevur stóran týdning fyri felagið, sæst eisini aftur í, at fyrisitingarliga liggja øll liðini hjá KÍ, uttan besta mansliðið, undir KÍ-akademinum.

## MERKJA STÓRA TILGONGD

Formaðurin í Klaksvíkar Ítróttarfelag greiðir frá, at fíggjarliga hongur KÍ-akademiið saman soleiðis, at nevndin í felagnum hevur avgjørt at seta eina ávísa upphædd av til akademiið í nøkur ár fram.

– At vit so fáa góð úrslit í Evropa og harvið eisini fíggjarligan vinning, fær eisini eina jaliga ávirkan á akademiið, sigur Tummas Lervig.

Ikki færri enn fýra ungdómsvenjarar eru í fullum starvi í KÍ sambært formanninum, sum leggur aftur at, at nevndin leggur sera stóran dent á, at man hevur toppkvalifiseraðar venjarar til øll ungdómsliðini í KÍ.

– Tað haldi eg eisini sæst aftur, og áhugin fyri at spæla við KÍ er stórur millum tey ungu, tí vit merkja stóra tilgongd av leikarum í øllum aldri, sigur Tummas Lervig.



*Tummas Lervig, KÍ-formaður*




## KÍ ER BLIVIÐ EITT ÁHUGAVERT NAVN

Góðu úrslitini hjá KÍ í Evropa í fjør hava havt stóra ávirkan á felagið og áhugan fyri Klaksvíkar Ítróttarfelag.

– Tað er einki at ivast í, at KÍ er blivið eitt áhugavert navn í altjóða fótbólt. Bæði leikarar og onnur hava stóran áhuga í at koma til Klaksvíkar, og tað setir eisini nøkur krøv til okkum sum felag. Tí hevur tað havt stóran týdning fyri okkum, at vit finna røttu fólkini til at gera arbeiði fyri okkum.

– Tí vit ynskja millum annað, at venjarar og onnur taka ábyrgd, so dagligdagurin hjá okkum ikki blívur ov strævin. Tí at sita í nevndini í KÍ fer við nógvari tíð, men er man væl skipaður, so verður tað ikki so strævið, sigur Tummas Lervig, formaður.

Hann sigur, at tað er av stórum týdningi, at fólk ikki koyra troytt.

– Vit hava verið ímyndin av stabila felagnum í landinum við nevnd, sum hevur sitið leingi og einum langtíðarvenjara, tá ið Mikkjal Thomassen var her, sigur Tummas Lervig.



***“Tað er einki at ivast í, at KÍ er blivið eitt áhugavert navn í altjóða fótbólt”***

## FELAGIÐ ER FÍGGJARLIGA TRYGGJAÐ

Á aðalfundi herfyri kundi KÍ kunngera ein ársroknskap fyri 2023, sum vísti eitt metstórt yvirskot orsaka av luttøkuni í bólkaspælinum í UEFA Europa Conference League.

– Tað hevur langtíðartryggja felagið fíggjarliga og haldføri í felagnum fleiri ár fram. Men tað setir eisini krøv til okkum sum nevnd. Tí hava vit eisini fingið okkum fíggjarliga ráðgeving fyri at gera tingini rætt, og vit hava lurtað eftir ráðgevingini hjá peningastovnunum hjá okkum, greiðir formaðurin í KÍ frá.

Hann sigur, at KÍ ætlar sær út aftur í bólkaspæli sum skjótast, men tað merkir ikki, at man satsar garrvilt fyri at røkka hesum máli aftur í ár.

– Vit skulu ikki skjóta allar milliónirnar av í einum. Hendan inntøkan frá bólkaspælinum skal langtíðartryggja okkum, sigur Tummas Lervig.

## ERU KOMNIR SEINT Í GONGD

Hjá monnunum hjá KÍ endaði kappingarárið í fjør ikki fyrr enn stutt undan jólum, og tað hevur verið ein av orsøkunum til, at man í ár er komin seinni í gongd aftur við venjingina, samanborið við hini føroysku feløgini.

– So seldu vit eisini venjaran og fingu ein nýggjan, men tað órógvaði ikki tað stóra. Liðið fór á venjingarlegu og fekk nakrar góðar dystir móti sera sterkari mótstøðu, so vit skulu nokk vera klárir, tá ið kappingin byrjar, sigur Tummas Lervig.

Spurdur, um málsetningin hjá KÍ fyri kappingarárið 2024, sigur formaðurin, at man sjálvandi vil endurvinna meistaraheitið og helst eisini koma langt í steypakappingini, og so droymir man eisini um at koma í europeiskt bólkaspæl aftur í ár.





# DROYMA UM HEILAN VØLL Í MIÐVÁGI

*MB er í serstøðu í føroyskum fótbólti. Tey hava bara eitt ungdómslið á heilum vølli, men dreymurin er at tilgongdin í yngru deildunum heldur fram, so felagið eisini kann manna eitt vaksnamannalið, sum spælir á heilum vølli*

Meðan tey flestu feløgini í Føroyum síggja stórt í besta mans- og kvinnuliðnum, so er veruleikin í Miðvági ein annar. Størsti denturin verður lagdur á tey yngri ungdómsliðini, og málið er í størri mun, at børn og ung trívast, heldur at vinna.

Tað sigur Elisabeth Haraldsen, forkvinna í Miðvágs Bóltfelag. Hon er saman við øðrum drívmegin í MB. Felagið hevur í løtuni viðgongd í ungdómsdeildunum, og á gentusíðuni riggar samstarvið við 07 Vestur væl.

Søguríka felagið liggur millum Sandavág og Sørvág, sum er lagt saman til 07 Vestur. Mangan hevur prátið verið um samanlegging, men í Miðvági hugsavna tey seg um at fáa tey ungu at trívast.

– Vit hava eitt samstarv við 07 Vestur um gentur U16. Tað hevur riggað væl, tí tað er eitt samstarv á jøvnum føti, sigur Elisabeth Haraldsen.

Júst genturnar á felags U16-liðnum geva eina vón um, at kvinnufótbólturin hevur eina bjarta framtíð í Vágum.

– Hesin árgangurin hevur hildið saman øll árini. Venjaratoymið hevur verið tað sama, og genturnar halda nógv saman. Bæði á og uttanfyri vøllin. Fráfallið hevur verið lítið, og hugurin at spæla er stórur. Tær tíma veruliga at spæla fótbólt og brenna fyri tí, greiðir Elisabeth Haraldsen frá



**"Tað krevur nógv at fáa eitt felag sum MB at mæla runt. Ikki tí vit skylda nakað, men tað skulu alíkavæl pengar til"**




*Elisabeth Haraldsen, MB-forkvinna*

MB hevur í løtuni U5, U7 og U9 hjá gentum, og dreymurin at tær eisini klára at manna eitt U11 lið og spæla á heilum vølli í framtíðini.

– Vit hava eisini eitt samstarv í Vestmanna, har Laila Símunardóttir Hansen hevur barnafótbólt. Tað samstarvið hevur gjørt, at vit til onkra U7-kapping hava havt fýra lið við. Hetta hevur verið eitt stuttligt og gevandi samstarv, sigur Elisabeth Haraldsen.

## FINGU EIN SKELK

Tað kom sum ein skelkur fyri MB, tá Fótbóltssamband Føroya valdi at flyta besta mansliðið upp í 2. deild. Hetta er ikki uttan orsøk, og forkvinnan sær væl fyrimunirnar, men tað setur eisini størri krøv til felagið.

Hon vísur á, at í 3. deild eru mangan avlýsingar og tað er óskipaði viðurskifti. Eitt nú hvør skal døma og hvørjum liðum tú møtir – um tey møta upp. Bæði MB og Royn blivu flutt upp í 2. deild stutt fyri kappingarbyrjan, og tað tók eina løtu hjá MB at fótað sær.

– Venjarin var ikki komin til landið, og nakrir av spælarum fingu ein kvøkk, tá teir nú skuldu spæla móti væl betri liðum. Tað sást eisini á úrslitunum, men sum kappingin gekk, haldi eg, at spælið bleiv nógv betri, og til í ár eru menn longu farnir út at venja í januar, sigur Elisabeth Haraldsen.

Í 2. deild eru skipaði viðurskifti. Dómarar verða settir av FSF, kappingin er væl skipað, og tað ber í størri mun til at fyrireka seg til dyst, tí liðini eru ikki tilvildarliga sett saman.

– Vit upplivdu onkuntíð at møta liðum við fyrrverandi landsliðsspælarum, og til aðrar tíðir var talan um "øl-fótbólt". Vit arbeiða nú við at fáa gjørt umstøðurnar betri til at hava eitt 2. deildarlið, tí tað krevur nógv meira av felagnum, sigur forkvinnan.

Tað eru eisini dreingjalið í MB, men tað eru eftirhondini nøkur ár síðani, at teir í hvítum og ljósabláum hava spælt á heilum vølli.

## SKYLDA ONGUM NAKAÐ – MEN...

Miðvágs Bóltfelag er í góðum hondum hvat skuld viðvíkur. Felagið skyldar ongum nakað, men tað er hart arbeiði at fáa pengar.

– Tað krevur nógv at fáa eitt felag sum MB at mæla runt. Ikki tí vit skylda nakað ella hava eitt dýrt besta lið, men tað skulu alíkavæl pengar til at fáa raksturin at bera seg. Hetta er kanska tað økið, har vit kunnu seta meira inn. Tað er torført at fáa stórar stuðlar, sigur forkvinnan og leggur afturat:

– Vit royna at hava MB-húsið opið, og vit hava eitt nú skift vindeygu. Men eg havi eisini upplivað, at onkur hevur spurt um vit ikki kunnu fáa heitt vatn í brúsunum. Eg visti ikki av, at tað bara var kalt vatn. Tað er broytt, men tað sigur eitt sindur um, hvat fyri avbjóðingar vit hava.

Í Miðvági gleðast tey um, at vøllurin verður skiftur í summar. Tey ungu tykjast hava tað gott, og fyribils er alt prát um samanlegging lagt til viks. Heldur samstarva tey har, tað gagnar báðum pørtum.



# Landsliðini hjá FSF skrá 2024

| | | |
|---|---|---|
| 8. februar | **A menn** | Lutakast / UEFA Nations League |
| 22. februar | **A kvinnur** | Malta – **Føroyar** ( Venjingardystur ) |
| 25. februar | **A kvinnur** | Albania – **Føroyar** ( Venjingardystur ) |
| 5. mars | **A kvinnur** | Lutakast / EM 2025 |
| 11. - 20. mars | **U17 dreingir** | UEFA menningarkapping í Gibraltar |
| 15. - 23. mars | **U17 gentur** | EM-undankapping í Føroyum |
| 21. mars | **U21** | Portugal – **Føroyar** (EM 2025) |
| 26. mars | **A menn** | Danmark – **Føroyar** (venjingard.) |
| 3. - 9. apríl | **A kvinnur** | EM-undankapping |
| 1. - 7. apríl | **U19 gentur** | EM-undankapping í Turkalandi |
| 6. - 11. mai | **U15 dreingir** | EfB NORSEA Elite Cup í Esbjerg |
| 12. - 20. mai | **U17 gentur** | UEFA menningarkapping í Moldova |
| 27. mai - 4. juni | **A kvinnur** | EM-undankapping |
| 29. juni - 3. juli | **U17 gentur** | Baltic Cup í Estlandi |
| 8. - 16. juli | **A kvinnur** | EM-undankapping |
| 19. - 23. august | **U15 gentur** | Baltic Cup í Estlandi |
| 5. septembur | **U21** | Kroatia – **Føroyar** (EM 2025) |
| 5. - 7. septembur | **A menn** | UEFA Nations League |
| 8. - 10. septembur | **A menn** | UEFA Nations League |
| 10. septembur | **U21** | **Føroyar** – Grikkaland (EM 2025) |
| 11. - 16. septembur | **U17 gentur** | Baltic Cup í Estlandi |
| 10. - 12. oktobur | **A menn** | UEFA Nations League |
| 11. oktobur | **U21** | **Føroyar** – Portugal (EM 2025) |
| 13. - 15. oktobur | **A menn** | UEFA Nations League |
| 15. oktobur | **U21** | **Føroyar** – Belarus (EM 2025) |
| 14. - 16. novembur | **A menn** | UEFA Nations League |
| 17. - 19. novembur | **A menn** | UEFA Nations League |

*Sí eisini á* ***www.fsf.fo***



# NÝGGJUR VØLLUR OVAST Á DAGSSKRÁNNI

*Hjá bóltfelagnum Royn í Hvalba er eitt av avgjørdu aðalmálunum í løtuni at fáa nýggjan vøll. Hetta er neyðugt, um felagnum skal vera lív lagað, heldur formaðurin*

Á heysti í fjør fekk Royn nýggjan formann, tá ið Oddur Norðberg tók við sessinum. Hann greiðir frá, at Royn í løtuni hevur tvey aðalmál fyri framman.

– Ein nýggjur vøllur er nakað, sum vit brúka nógva orku uppá. Tað arbeiðið er í gongd, og vónandi hava vit okkurt ítøkiligt klárt í summar, sigur Oddur Norðberg.

## EITT STÓRT TAK FYRI FELAGIÐ

Oddur Norðberg leggur afturat, at tað er alneyðugt fyri framtíðina hjá Royn, at hugt verður nærri at umstøðunum kring felagið, og her er serliga talan um nýggjan vøll á Skørðunum í Hvalba.

– Vallarumstøðurnar eru ikki meiri enn næstbest, og hetta er nakað av tí, sum vit brúka mest orku uppá í løtuni. Tekningar eru komnar, og fyrireikandi arbeiðið er klárt. Nú ræður bara um at fáa fíggingina endaliga upp á pláss, sigur Oddur Norðberg.

Formaðurin í Royn greiðir frá, at nýggi vøllurin skal sum so staðsetast á sama stað sum núverandi vøllur, men at nýggi vøllurin verður snaraður í mun til tann gamla, so tann nýggi vendur eystur og vestur.

Oddur Norðberg greiðir frá, at tað í fyrstu atløgu bara er felagið einsamalt, sum arbeiðir við hesi ætlan.

– Gamaní hevur kommunan játtað stuðul, skilt á tann hátt, at kommunan vil lata grót til planering av húsinum. Hetta er ikki nakar fíggjarligur stuðul sum so. Men vit í felagnum eru komin rímiliga væl áleiðis við fyrireikingunum, hóast vit ikki kunnu siga nakað endaligt um, at tað verður gjørt, sigur Oddur Norðberg.

Formaðurin í Royn sigur víðari, at talan er um eitt øgiliga stórt fíggjarligt tak hjá fótbóltsfelagnum í Hvalba.

– Umframt pengar hjá felagnum sjálvum og stuðul frá Fótbóltssambandinum, so skulu vit eisini søkja ymiskar danskar grunnar um stuðul, og játtan hagani er altavgerandi. Tað er eisini kommunuval í ár, og tað kann hava við sær, at Hvalbiar kommuna fer at játta okkum stuðul. Tað vóna vit, men tað manglar ikki so nógv í, at vit fáa fíggingina at hanga saman, sigur hann.

***“Tekningar eru komnar, og fyrireikandi arbeiðið er klárt. Nú ræður bara um at fáa fíggingina endaliga upp á pláss”***




## SJEY LIÐ Í UNGDÓMS-DEILDUNUM

Á ítróttarliga økinum fokuserar Royn fyrst og fremst upp á barnafótbóltin, og serliga er tað gentufótbólturin, sum felagið satsar nógv uppá.

– Vit vilja geva teimum best hugsandi umstøður. Okkara ynski er, at vit kunnu halda fram við at menna barna- og ungdómsfótbóltin í Hvalba, tí serliga gentufótbólturin hevur verið í eini ótrúligari menning í seinastuni, sigur Oddur Norðberg.

Sambært formanninum í Royn hevur gentufótbólturin í Hvalba verið ein sonn sólskinssøga seinastu árini, og um stutta tíð fara vit at síggja fleiri ungar gentur úr Hvalba spæla í bestu kvinnudeildini.

– Og so er tað liðið hjá okkum í 2. deild hjá monnum. Í ár koma vit at hava liðið koyrandi, uttan at vit hava so nógvar ambitiónir um at flyta upp, sigur Oddur Norðberg.

Formaðurin leggur samstundis afturat, at Royn hevur ikki fíggjarliga orku til at styrkja sær liðið við eitt nú útlendingum, og at man er sannførdur um, at vegurin fram er at styrkja tað lokala tilfeingi.

– Vit mistu eitt heilt ættarlið av leikarum fyri nøkrum árum síðani, men beint nú eru vit 2-3 ár frá at fáa ungar, lokalar leikarar ígjøgnum aftur, og vónandi kunnu vit tá fáa fleiri ungar lokalar leikarar inn á liðið, og so kunnu vit kanska skrúva upp fyri ambitiónunum, sigur formaðurin í Royn, Oddur Norðberg at enda.


*Oddur Norðberg, Royn-formaður*

## SØGULIGA ÁRIÐ ROYNDIST VÆL

Í fjør fylti Royn 100 ár, og søguliga árið royndist væl hjá hvalbingum.

Bóltfelagið Royn í Hvalba telist millum eldru fótbóltsfeløgini í landinum. Í fjør fór felagið um tey 100 árini, og støðan hjá felagnum er faktiskt rættiliga góð í løtuni. Umframt at Royn fylti 100 ár, so bleiv Roynhøllin eisini 50 ár í fjør, so tað var nógv at feira í Hvalba í farna árið.

## NÓGV VIRKSEMI

Bóltfelagið Royn hevur rættiliga nógv virksemi, og felagið hevur fleiri lið á bæði gentu- og dreingjasíðuni.

Í rúma tíð hevur felagið lagt stóran dent á ungdómsarbeiðið, og man hevur brúkt nógva orku uppá, at felagið skal hava væl útbúnar og væl skikkaðar venjarar til ungdómin.

Hetta gevur eisini úrslit, tí ungdómsliðini tykjast mennast fyri hvørt ár, sum gongur, og tað mest týdningarmikla av øllum er, at tey ungu í bygdini blíva verandi í fótbóltinum.

Í fjør eydnaðist tað so eisini felagnum at hava eitt ungdómslið, sum vann heiðursmerki í síni kapping. Tað vóru U13 genturnar hjá Royn, sum endaðu á einum silvurplássi í finaluumfarinum, og tað bleiv hátíðarhildið í Hvalba.

Genturnar spældu finaluumfarið norðanfjørðs, og tá ið tær komu aftur til Hvalbiar, var skipað fyri móttøku í Roynhøllini.

## FRAMGONGD Á KVINNUSÍÐUNI

Royn er eisini partur av felagsliðnum fyri kvinnur, sum er í Suðuroynni, og í fjør endaði liðið aftast í Betri Deildini. Men um samanborið verður við árið fyri, tá liðið einki stig fekk, so eydnaðist tað í 2023 at fáa fýra stig fyri fýra javnleikir.

Um man so samstundis hevur í huga, at U13 genturnar hjá Royn vunnu silvur í finaluumfarinum, so kann staðfestast, at tað er ein framgongd á kvinnusíðuni hjá Royn og eisini hinum feløgunum í oynni.

Tað man tí vera lítil ivi um, at tað er hugaligari hjá ungu gentunum og kvinnunum at spæla í bestu deildini, tá ið man nú fær úrslit, sum síggjast aftur á stigatalvuni.

Besta mansliðið hjá Royn spælir í 2. deild, og eftir eina góða byrjan upp á kappingarárið í fjør, var gongdin heldur misvís í seinnu helvt. Liðið endaði niðarlaga á stigatalvuni, hóast talan var eitt gott lop aftur til aftastu liðini.



Beinleiðis til

NEW YORK

Vit flúgva beinleiðis til **New York** týsdagar frá **03. september til 08. oktober 2024.** Heimferðin er mikudagar. *Prísur báðar vegir úr 5.199,-*



Les meira á **atlantic.fo/newyork**

ATLANTIC AIRWAYS



# FELAGSSKAPURIN ER FYRI ØLL

*Tá tað kemur til gentu- og kvinnufótbólt í Eysturkommunu, so er sera torført ikki at nevna Hannu Erlingsdóttir Olsen. Ein eldsál, sum veruliga hevur slóðað fyri, at kvinnurnar hava fingið munandi betri karmar at virka undir*

***Svenn Olsen, venjari hjá Víkinga-kvinnum***

## KVINNUFÓTBÓLTUR ER ONGIN DØGNFLUGA

– Nú eru vit í gongd við fjórða árið sum Víkingur, og eg haldi at vit byggja uppá hvørt ár. Fyri okkum sum felag hevur tað eisini týdning, at tú sum felag byggir uppá, soleiðis at tú kanst standa inn fyri tí tú ger, og at tað er burðardygt í longdini, og ikki bert ein døgnfluga, sigur Hanna Olsen, sum sjálv spældi nógv fótbólt sum ung. Hanna hevur sostatt verið í felagsarbeiði alt sítt lív, og neistin brennir sum ongantíð áður hjá sterku víkingakvinnuni.

Kvinnurnar í Víkingi hava somu karmar sum menninir, og hóast venjaratoymið er broytt, so verður altíð arbeitt við at betra um toymið, sigur Hanna avgjørd.

***"Seinastu árini er tað blivið eitt prestisjumál fyri feløgini, at tey eisini hava kvinnulið"***

– Til komandi kappingarár hava vit fingið nýtt venjarapar í Svenn Olsen og Hans Andriasi Olsen, og teir arbeiða víðari við tí frálíka arbeiðinum, sum Súni Olsen hevur gjørt í nøkur ár. Harafturat hava vit fingið fysioterapeutin, Katrinu Petersen afturat toyminum sum tekur sær av kvinnunum, og tað eru vit sera fegin um. Katrin kemur eisini at taka sær av fysiskum venjingum, sigur Hanna Erlingsdóttir Olsen, sum umframt sítt kollosala sjálvboðna arbeiði, esini er næstforkvinna í Víkingi.

## UMRÁÐANDI AT BÆÐI KYNINI ERU UMBOÐAÐI

Hanna Olsen er púra sannførd um, at tað hevur sera stóran týdning fyri eitt felag, at hava bæði kynini umboðaði.

– Eg haldi, at tey seinastu árini er tað blivið eitt prestisjumál fyri feløgini, at tey eisini hava kvinnulið, sigur Hanna, og hon leggur afturat, at felagskapurin er fyri øll, og tá er sera umráðandi at kvinnurnar eisini eru væl umboðaðar.

## KÆRKOMIN TILGONGD Í LEIKARAHÓPINUM

Undan farna kappingarári bleiv greitt, at Jensa Tórolvsdóttir fór at royna seg í donskum fótbólti, og í summar fór Mona Rasmusdóttir eisini sama veg. Hesar báðar vóru sera eyðsýndar á Víkingaliðnum, og tað var vorið sum missur. Men nú eru báðar komnar aftur til barndómsfelagið, umframt nakrar aðrar afturat, og nú sær aftur rættiliga spennandi út í Víkingi.

Mona Rasmusdóttir gleðist nú yvir, at koma heim aftur til Víking og tann felagskapin henni dámar so væl.

– Eg fekk ein spennandi møguleika at royna meg uttanlands, og tað var ein deilig og lærurík tíð, við stórum avbjóðingum, nýggjum venjaratoymi og nýggjum leikskipanum. Øllum hesum lærdi eg nógv av, og royndirnar taki eg við mær aftur í Sarpugerð, sigur Mona, sum eins og Jensa royndi seg í danska felagnum, FC Thy úr Thisted.

Umframt Monu og Jensu, hevur Víkingur eisini fingið tilgongd av sterka málverjanum, Eyðgerð Mikkelsen og Leu Lisberg, sum mangan hevur víst seg at verið ein sterkur leikari við góðum máltevi. Allar hesar fýra hava eisini umboðað A-landsliðið.

## SAMANHALDIÐ ER TAÐ BESTA

– Vit hava eitt væl skipað felag í Víkingi, harafturat hava vit eitt væl skipað venjaratoymi, og okkara samanhald er av tí besta uppá tvørs av aldri. Hetta ger, at tað er stuttligt og hugaligt at fara til venjingar fleiri ferðir um vikuna, sigur Mona Rasmusdóttir, sum saman við liðfeløgum sínum ætla at geva oddaliðunum frá í fjør eina sterka mótstøðu í ár. At enda sigur Mona avgjørd, at tað er best at spæla í ljósabláum.















*Brandur Jacobsen, formaður hjá Víkingi*

### VÍKINGUR ER EITT SUNT FELAG

Sjálvboðið arbeiði er grundarsteinurin undir einumhvørjum ítróttarfelag, og tað er tað eisini í fótbóltsfelagnum í Eysturkommunu.

Felagið kann eisini reypa sær av, at hava ein kolossalan stuðul í nærumhvørvinum. Aktivu limir felagsins telja heili 300 børn og umleið 150 vaksin, og so koma øll tey mongu sjálvbodnu hjálparfólkini afturat. Brandur Jacobsen er formaður í Víkingi, og hann staðfestir, at tey hava ein sunnan felagskap.

– Grundarsteinurin í felagnum er framvegis tað sjálvbodna arbeiðið, har vit eiga eitt ótal av fólki, sum leggja arbeiði í Víking, og saman lyfta vit felagskapin, sigur stolti formaðurin.

### NÝGGIR SPÍRAR BANKA Á DYRNAR

Ein av ungu og spennandi leikarunum í Víkingi er 18 ára gamli Árni Nóa Atlason. Hóast sín unga aldur, so hevur Árni longu spælt 18 dystir í bestu deildini. Hann fekk longu sínar fyrstu minuttir í 2022, og farna kappingarár fekk hann, sambært Faroesoccer.com, dystartíð í 17 dystum fyri besta liðið.

Árni er sonur verjukempuna og fyrrverandi landsliðsleikaran, Atla Gregersen, og uppkallaður eftir stolta abbanum, Árna Gregersen.

Árni heldur, at hópurin hjá Víkingi er sterkur í ár, og at tilgongdin av leikarum sær sera spennandi út.

– Vit mistu gamaní Martin Klein Joensen, sum fór til Íslands, men í Jørgeni Nielsen hava vit ein spennandi leikara, sigur ungi miðvallarin. Árni gleðist eisini yvir, at Bergur Gregersen aftur er í hópinum, eftir at hann var til skips ein part av árinum í fjør.

### FLEIRI UNGIR NÆRKAST SPÆLITÍÐ

Sambært Árna, so er ikki lætt hjá yngri leikarum at spæla seg inn á besta liðið hjá Víkingi, men hann roknar tó við, at vit í ár fara at síggja nøkur nýggj nøvn, ið vit skulu venja okkum við.

– Besta mansliðið hjá Víkingi er rættiliga sterkt, og tað er harafturat væl samanspælt, men hóast tað, so rokni eg við, at nakrir av teimum ungu á 1. deildarliðnum sleppa at royna seg. Har eru sera spennandi leikarar, bæði verju- og álopskendir, og í ár fara teir ivaleyst at fáa nakrar minuttir á besta liðnum, sigur ungi miðvallarin, sum sjálvur hevur sum mál at fáa enn fleiri minuttir fyri besta liðið.

### FORMAÐURIN ER BJARTSKYGDUR

Á aðalfundinum í februar varð Brandur Jacobsen endurvaldur í nevndina hjá Víkingi, og eftir fundin, eisini sum formaður felagsins. Og spurdur, hvørji mál Víkingur hevur fyri komandi kappingarár, svarar Brandur greiður, at teir hava eitt støðugt langtíðarmál um, at besta lið felagsins skal vera í toppinum í føroyskum fótbólti.

Fleiri av leikarunum hjá Víkingi eru ikki heilt ungir longur, men støðið er kortini sera høgt. Og formaðurin viðgongur, at tað í øllum væl skipaðum feløgum eigur at vera eitt natúrligt ættarliðsskifti, og at tað eisini er væl ávegis í Víkingi.

Men samstundis ynskir Brandur Jacobsen at takka eldru leikarunum fyri teirra fantastiska íkast, og at teir halda áfram, tá tað er brúk fyri teimum í menningini av yngru leikarunum. At enda staðfestir Brandur Jacobsen, at Víkingahópurin er væl fyri í ár.

– Hópurin er væl fyri, sum hann natúrliga blívur við einum hart arbeiðandi venjara sum Jóhan Petur Poulsen, sigur avgjørdi formaðurin í Víkingi at enda.





# Størsta fótbóltskapping í Føroyum nakrantíð

*Á vári komandi ár verður Fótbóltssamband Føroya vertur fyri EM-endaspælinum hjá U17-gentum. Tað er nógv tann største altjóða kappingin, sum FSF nakrantíð hevur skipað fyri*

Tað fer at síggjast aftur í býarmyndini, at Fótbóltssamband Føroya í mai mánað komandi ár fer at skipa fyri EM-endaspælinum hjá U17-gentum. Talan er um kappingina, har europameistarin í hesum aldursbólki skal kjósast, og umframt okkara føroyska U17-landslið, koma sjey tey fremstu gentulandsliðini í Evropa til Føroya at kappast um EM-heitið.

## BRÚKA TVEIR VALLIR

Til sjálva kappingina verða tveir leikvallir brúktir sum dystarvallir. Tað eru tjóðarleikvøllurin Tórsvøllur og so vøllurin á Djúpumýru í Klaksvík.

Harumframt koma liðini eisini at brúka aðrir vallir í sambandi við venjing, og tað verður mett, at tilsamans koma eini 400 fólk til Føroya í sambandi við kappingina, og tá eru áskoðarar ikki íroknaðir.

Júst hvørji lið, ið koma at taka lut í kappingini, umframt Føroyar sum vertstjóð, er ikki greitt enn, og tað verður heldur ikki greitt fyrr enn í mars mánað komandi ár.

– Tað er einki at ivast í, at hetta er nakað, sum kemur at seta sín dám á býarmyndina bæði í Havn og í Klaksvík, meðan kappingin koyrir, sigur Andras Kjartansson Thomassen, ið vegna FSF stendur á odda fyri fyriskipanina av kappingini.



Andras K. Thomassen, FSF

**“Vit vilja fegin fyriskipa eina góða og væleydnaða kapping”**

Hann greiðir frá, at talan er um nógv tí størstu altjóðu kappingina, ið FSF nakrantíð hevur fyriskipað.

– Vit hava áður skipað fyri norðurlandameistarakapping, har átta lið eisini hava luttikið, men tá hava krøvini langt frá verið tey somu, sum tey eru til hetta EM-endaspælið, sigur Andras Kjartansson.

Sjálv kappingin kemur at vara í tvær vikur, og FSF ætlar at gera nógv burturúr at marknaðarføra kappingina.

– Tað er eitt sindur upp til okkum, hvussu nógv vit gera burturúr. Men vit vilja gjarna gera nógv burturúr, og vit vilja fegin fyriskipa eina góða og væleydnaða kapping. Tað hevur eisini eitt týðandi signalvirði yvir fyri UEFA, sigur Andras.

UEFA WOMEN'S UNDER-17 CHAMPIONSHIP ™

## VAR ÆTLAÐ AT VERA Í 2021

Upprunaliga var ætlanin, at Fótbóltssamband Føroya skuldi vera vertur fyri EM-endaspælinum hjá U17-gentunum í 2021, men orsaka av koronufarsóttina bleiv hendan kappingin av ongum.

– Bæði tann, sum vit skuldu skipa fyri í 2021, og tann árið fyri, sum skuldi vera í Svøríki, blivu av ongum orsaka av korona. Tí skal Svøríki í staðin skipa fyri kappingini í ár, meðan vit skipa fyri henni komandi ár, sigur Andrass Kjartansson Thomassen.

At skipa fyri einum slíkum endaspæli krevur nógva orku, og UEFA væntar eisini, at tað eru fólk hjá FSF, sum koma meiri ella minni burturav at fyriskipa kappingina.

– Frá 1. mai í ár væntar UEFA, at eitt fólk arbeiðir fulla tíð við fyrireikingunum, og so líðandi økist virksemið. Á nýggjárinum eru tað kanska eini trý fólk, sum arbeiða við tí, og frá 1. mai 2025, also beint undan kappingini, kann man vænta, at so at siga øll, ella eini 13-14 fólk, koma at arbeiða burturav við EM-endaspælinum, sigur Andrass Kjartansson Thomassen.

Væntandi verður eisini tørvur á at fáa fleiri sjálvboðin, sum kunnu hjálpa til við øllum rundanum kappingina, sum veruliga fer at seta sín dám á virksemið hjá FSF næsta árið og gott og væl tað.

# TAÐ SKAL VERA SO LOKALT SUM GJØRLIGT

*Í nógv ár hava tey í 07 Vestur arbeitt við, at bulurin á besta mansliðnum skal vera lokalur. Hetta hevur givið úrslit, hóast man í ár hevur tørv á fleiri útlendingum enn vanligt*

– Tankin um at byggja eina lokala stammu byrjaði fyri sløkum 10 árum síðani. Tá settu vit Jens Erik Rasmussen í fulltíðarstarv sum ungdómsvenjara. Tað var slóðbrótandi, tí eg meini, at vit vóru fyrsta felag í landinum, sum setti ein ungdómsvenjara í fulltíðarstarv, sigur Jón Nordendal, formaður í 07 Vestur.

### BYRJAÐI VIÐ TEIMUM HEILT UNGU

At tað fór at taka tíð, var man fullvæl greiður yvir, og millum annað tí byrjaði Jens Erik Rasmussen tá at arbeiða við teimum 7-8 ára gomlu dreingjunum.

– Tað eru teir, sum í dag eru 17-18 ára gamlir og standa og banka uppá dyrnar til besta liðið hjá felagnum, greiðir formaðurin í 07 Vestur frá.


Jón Nordendal, 07V-formaður

Jón Nordendal sigur, at tað ongantíð hevur verið talan um eina strategi, sum hevur verið fest á blað, tí man vil heldur tillaga seg árgangir og umstøðurnar annars.

– Hetta er nakað, sum vit royna at skapa sjálvi, og tað skal hóska til mentanina í felagnum. Vandin við at hava eina niðurskrivaða strategi kann vera, at hon læsir okkum ov nógv í okkara arbeiði, sigur hann.

Sjálvi halda tey í 07 Vestur, at arbeiðið hevur givið úrslit.

– Tað er eingin ivi um, at tað hevur givið úrslit. Í dag eru vit eisini nógv meiri stabilir í bestu deildini hjá monnum, enn vit hava verið áður. Harumframt hava vit u-landsliðsleikarar í øllum árgangum á dreingjasíðuni, og í nøkrum árgangum er talan um fleiri leikarar, sigur Jón Nordendal.



### NEYÐUGT VIÐ ÚTLENDSKUM STYRKI

Hóast man leingi hevur arbeitt við at hava eina lokala stammu á liðnum, so hevur man í ár verið noyddur til at fáa sær fleiri útlendskar leikarar.

– Hetta er neyðugt í ár, tí vit hava mist fleiri lokalar, umfram fleiri føroyingar, sum ikki eru uppvaksnir í felagnum. Vit hava roynt at styrkt um liðið við føroyskum leikarum, men tað hevur ikki eydnast serliga væl í ár.

– Tað er tískil neyðugt at styrkja liðið við útlendingum, tí vit skulu eisini halda eitt ávíst støði til venjing, tí tað er eisini motiverandi fyri yngru leikararnar í felagnum, at støðið er høgt, um menningin hjá teimum skal halda fram, sigur formaðurin í 07 Vestur.

At tað í ár eru nógvir útlendingar á liðnum hjá vágamonnum, letur eisini upp fyri nýggjum møguleikum.

– Tað hevur so við sær, at vit hava møguleika fyri at hava tvær venjingar um dagin nakrar ferðir um vikuna, tí tað eru so nógvir leikarar, ið eru tøkir til tað, sigur Jón Nordendal.

Formaðurin í 07 Vestur dylur tó ikki fyri, at man helst vil hava lokalar leikarar at manna liðið.

– Tað er tó eingin ivi um, at vit vilja hava lokalar leikarar á liðnum, men tað krevur so eisini, at teir taka av, tá ið teir fáa møguleikan. Gáttin at sleppa á besta liðið hjá 07 Vestur er hækkað munandi seinnu árini, og tað setur hægri krøv til okkum øll, sigur hann.



### STABIL UNGDÓMSLIÐ

Í fjør eydnaðist tað 07 Vestur at vinna U21-kappingina, og tað hevur stóran týdning fyri felagið sambært formanninum.







– Tað hevði stóran týdning. Vit brúka tað liðið sum ein hátt at tryggja ungu leikarunum hjá okkum nóg mikið av spælitíð. Høvuðsendamálið við U21-liðnum er at halda leikarum til, sigur formaðurin.

Í Vágum fegnast tey annars um, at limatalið í yngru deildunum er stabilt.

– Serliga hugaligt er tað, at limatalið í til dømis U21 og U17 árgangunum er vaksandi, tí vit vita, at tað er nakað, sum nógv feløg annars stríðast við, tí leikarar fella frá í tí aldrinum, sigur Jón Nordendal.

Hann greiðir samstundis frá, at felagið eisini hevur gjørt eina ætlan fyri, hvussu yvirgongdin hjá ungum leikarum frá ungdómsfótbólti til vaksnamannafótbólt skal ganga fyri seg.

– Umskifti frá ungdómsfótbólti til vaksnamannafótbólt kann vera ógvusligt, serliga tá støðið nú er vorðið so mikið høgt, sum tað er hjá okkum. Tí hava vit lagt okkum eftir at seta venjarar kring besta, næstbesta og elstu ungdómsliðini, sum skilja avbjóðingarnar og kunnu samstarva um at skapa eina – fyri einstaka leikaran – trygga og jaliga yvirgongd.

– Allir leikarar, sum hava rætta hugburðin fáa møgulleikan at luttaka, og vit vóna sjálvandi, at vit um nøkur ár fara at síggja hesar leikarar sum berandi bulin á fremsta liðnum í 07 Vestur, sigur formaðurin.

## GÓÐUR LOKALUR STUÐUL

At tað ber til hjá 07 Vestur at hava eitt lið, sum hevur stabiliserað seg í bestu deildini, er ikki minst takkað verið góðum lokalum stuðuli sambært Jón Nordendal.

– Vit hava sera góðan lokalan stuðul, sum ger tað gjørligt at hava skikkaðar venjarar um liðini hjá okkum. Sørvágs kommuna er ein sera góður viðspælari hjá 07 Vestur. Í løtuni gera vit eina stóra útbygging á stadionøkinum á Dungasandi í Sørvági, og tað vera brúktar nógvar kommunalar milliónir til tað.

***"Allir leikarar, sum hava rætta hugburðin fáa møguleikan at luttaka"***

– Vága kommuna hevur eisini gjørt íløgur í Valloyruna í Sandavági við nýggjum vølli, umframt at húsið í næstum verður útbygt við nýggjum umklæðingarrúmum, felagshølum og øðrum, sigur formaðurin í 07 Vestur.

Hann nevnir somuleiðis fjepparafelagið hjá felagnum, sum seinnu árini hevur verið eitt tað mest sjónliga í landinum.

– Vit hava havt nøkur fólk, sum hava stuðlað liðnum leingi, eisini tá tað gekk minni væl á vøllinum. Tey hava tikið stig til fjepparafelagið, og hava samstundis verið óført at skipa fyri og varpa ljós á 07 Vestur, sigur Jón Nordendal at enda.

## EINKI KVINNULIÐ Í ÁR

Hesi seinastu árini hevur 07 Vestur eisini havt lið í bestu kvinnudeildini, men soleiðis verður ikki í 2024.

– Vit hava trekt kvinnuliðið hjá okkum úr kappingini. Tað er harmiligt, men vit noyðast at gera tað, sigur Jón Nordendal, formaður.

Hann greiðir frá, at fyri nøkrum árum síðani var ein uppblóman á kvinnusíðuni í Vágum, tá ið liðið flutti upp í bestu kvinnudeildina.

– Tær fluttu upp, men vit sóu eisini, at tað var neyðugt við styrki fyri at tað skuldi bera til. Tað gekk væl fyrstu tvey árini, men so mistu vit fleiri leikarar og so gjørdist skjótt rættiliga strævið at hava liðið koyrandi, sigur formaðurin.

Jón Nordendal leggur aftur at, at man hevur roynt at funnið loysnir, so liðið kundi halda fram, men tað vísir seg ikki at bera til.

– Nú steðga vit so við kvinnuliðnum í eina tíð, og ístaðin fara vit saman við MB at hugsavna okkum um at menna gentusíðuna við støðið í leistinum, sum hevur verið brúktur á dreingjasíðuni. Vit trúgva uppá, at tað fer at eydnast at hava eitt kvinnulið í fremstu deildini, um Vágoyggin stendur saman um gentu- og kvinnufótbóltin, sigur Jón Nordendal at enda.





# Stórur munur á at vera hjálpardómari og dómari

*Eitt nýtt kappingarár stendur fyri durum, og hjá nýklakta altjóða hjálpardómaranum, Jógvani Breckmann er tað eitt spennandi ár, sum stendur fyri framman. Hjá roynda Andrew Christiansen er støðan ein onnur, tí hann hevur valt at takka fyri seg eftir 20 ár í bestu deildini. Vit hava hitt teir báðar til eitt prát um døming sum heild*



*Jógvan Breckmann*

Andrew Christiansen og Jógvan Breckmann hava í fleiri ár verið millum mest virdu hjálpardómarar í landinum. Men nú gevst annar, meðan hin bíðar spentur eftir fleiri altjóða uppgávum.

– Eg byrjaði sum hjálpardómari í bestu deildini í 2003. Eg hevði roynt meg sum dómara í lægru deildum fleiri ferðir, men so ein dagin ringdi Oddmar Andreasen, sum tá var ein av fremstu dómarunum í landinum og spurdi, um eg kundi koma og vera hjálpardómari hjá honum í bestu deildini til ein dyst. Tað gjørdi eg so, og ætlanin var í fyrstu atløgu, at eg bara skuldi royna tað í eitt ár, men 20 ár seinni stóð eg framvegis í sama leikluti, greiðir Andrew Christiansen frá.

Hann er tó avgjørdur um, at nú er tað endaliga liðugt við døming.

– Tað er liðugt – punktum. Eg havi lagt flaggið frá mær, og eg tími ikki eingongd at hjálpa til við einum venjingardysti. Mín allarseinasti dystur var finalan um Løgmanssteypið í fjør, so eg endaði á toppinum, og soleiðis verður tað, sigur hann.

Jógvan Breckmann er ikki líka gamal í garði, um enn hann hevur dømt í nógv ár.

**“Tey flestu øsa seg um viðurskifti, ið tey í veruleikanum einki vita um. Ofta loysa fólk av, tí tey vita ikki betur”**

– Eg byrjaði í bestu deildini í 2018, men fyrstu ferð, at eg tók flagg í hond, var í 2009. Eg var áskoðari í Gundadali, tá ið ein hjálpardómari ikki møtti upp til ein dyst í 2. deild. Eg bleiv spurdur, um eg kundi traðka til, og tað gjørdi eg. Spakuliga gjørdi eg so meira og meira við døming, og í 2018 var eg so á fyrsta sinni hjálpardómari í Betri Deildini, greiðir hann frá.

## STÓRUR MUNUR Á LEIKLUTUNUM

Sum oftast vera teir fýra limirinir í einum dómarabólki til ein dyst – dómari, hjálpardómarar og fjórðidómari – mettir sum eitt, men sambært Andrew Christiansen og Jógvani Breckmann eru leiklutirnir hjá teimum sera ymiskir.

– Vit hjálpardómarar skulu altíð vera á rætta stað og vera rætt plaseraðir. Gjøgnum ein dyst hava vit eina rúgvu av sprintum, í veruleikanum hava vit næstan bara sprintir, meðan dómarin rennur við rímiliga javnari ferð og ikki hevur teir nógvu sprintirnar. Tí noyðast vit eisini at venja heilt øðrvísi, enn hvat dómararnir gera, siga teir báðir hjálpardómararnir.

Sambært Andrew og Jógvani ræður tað um hjá einum hjálpardómara at duga at lesa støðurnar í einum dysti, tí tað koma nógvir sprintar, og tá ræður um at vera á rætta stað.

– Tá ið man sum vit dømir í føroysku kappingini í nógv ár, so kennir tú leikararnar, og hvussu teir plaga at flyta seg. Tá dugir tú eisini í nógvum førum at forútsíggja støðuna, sum kemur, og tí vera á rætta stað, tá ein avlevering fellur til dømis. Men tá ið tú so dømir í altjóða høpi, er tað heilt øðrvísi. Tá kennir tú ikki leikararnar, og hvussu teir renna, og tí blívur tað ein enn størri avbjóðing, siga Andrew og Jógvan.

Ein stórur partur av døming er samskifti millum limirnar í dómarabólkinum, og tí er tað eisini umráðandi, at man venur samskifti og mannagongdir.

– Tað er ymiskt, hvussu dómararnir ynskja, at man samskiftir og arbeiðir. Men UEFA arbeiðir við at “streamlina” allar dómarar, og tað noyðast vit eisini at gera. Man má hava ein standard, so at dómarar ikki eru alt ov ymiskir, siga teir báðir.

## ANDREW FER NÚ AT EYGLEIÐA

Sum áðurnevnt gevst Andrew Christiansen nú við dømingini, men tað merkir tó ikki, at hann hvørvur úr fótbóltsumhvørvinum. Andrew fer nú undir bæði at vera dómarainstruktør og at virka sum dómaraeygleiðari.

– Teir allarflestu eygleiðararnir eru gamlir dómarar, og tí er tað eisini púra logiskt, at teir hyggja meiri eftir tí, sum dómarin ger, og ikki so nógv eftir okkum hjálpardómarum. Tí hava vit upplivað, at relevantar støður hjá okkum ikki vera tiknar upp í eftirmetingini eftir dyst, sigur hann.

Men eftir 20 ár sum hjálpardómari, hevur man so ikki upplivað eina rúgvu av broytingum í fótbóltinum?

– Eg haldi, at tann allarstørsta broytingin var, tá ið vit fingu ein fjórða dómara. Tí áðrenn hann kom, var hjálpardómari 1, sum er á tí síðuni, har útskiftingarbenkurnir eru, eisini tann, sum skuldi halda stýr á, hvussu atburðurin var á báðum bonkunum, umframt at man eisini skuldi taka sær av útskiftingum. Tí var tað eitt risa framstig at fáa ein fjórða dómara, sigur Andrew Christiansen.

Jógvan Breckmann leggur afturat, at í hansara tíð hevur ein tann størsta broytingin til tað betra verið, at limirnir í dómarabólkinum fingu “headsett” at samskifta við.

– Tað var eitt stórt framstig, sigur Jógvan Breckmann.

## ÁSKOÐARARNIR ERU HAMPULIGARI Í DAG

Báðir hava teir sum áðurnevnt verið virknir í nógv ár, og tí kunnu teir sjálvsagt eisini úttala seg um, hvussu atburðurin hjá áskoðarum er í dag í mun til fyri nøkrum árum síðani.

– Eg haldi, at tað var ein nógv ógvusligari málburður fyrr. Tá fekst tú veruliga nógv oman yvir teg, og áskoðararnir stóðu ótrúliga tætt við teg. Teir kundu næstan toga í ryggin á tær. Men tað er nógv broytt til tað betra, bæði viðvíkjandi málburði og við frástøðu til áskoðarar, sigur Andrew Christiansen.

– Teir sosialu miðlarnir seta okkum allar í fokus. Tey flestu øsa seg um viðurskifti, ið tey í veruleikanum einki vita um. Ofta loysa fólk av, tí tey vita ikki betur, og tað er einki filtur á sosialu miðlunum, sigur hann.



Andrew Christiansen

Andrew Christiansen sigur, at hóast áskoðarar sum heild eru hampuligir og fittir, so uppliva dómarar og hjálpardómarar keðiligar støður.

– Eg havi eisini upplivað onkrar keðiligar støður, tá ið man ikki dømir. Til dømis tá ið man er úti saman við familjuni hjá sær, og tað er keðiligt. Tað eru tíverri nógv, sum ikki duga sær hógv, sigur hann.

## ALLIR EIGA AT SLEPPA AT DØMA ØLL FELØG

Dómarar og hjálpardómarar í fótbólti skulu umboða eitt felag, og teir sleppa ikki at døma hetta felag. Hetta ber tó til í hondbólti, so hví ber tað ikki til í fótbólti?

– Vit duga ikki at síggja avbjóðingarnar við, at vit kunnu døma øll feløg. Vit eru professionellir, og hjá okkum fyllir tað at avrika best møguligt úti á vøllinum, tá ið gulir spæla móti bláum til dømis. Allir dómarar burdu kunna dømt øll feløg, siga teir báðir.

Teir halda eisini, at virðingin úti í feløgunum er blivin so mikið stór, at tað burdi borið til.

– Man kann siga, at virðingin er øgiliga nógv tengd at tær persónliga. Men virðingin fyri yrkinum er stór, og vit hava yvirhøvur góðar umstøður, har vit koma á vitjan, siga teir báðir.

## SPURNINGURIN UM VAR

Eitt heitt evni í fótbólti er nýtslan av VAR. Spurningurin um VAR í Føroyum hevur verið umrøddur fleiri ferðir, og teir báðir halda, at sum dómarar er tað gott, um sonevnt mini-VAR kemur til Føroya.

– Tí tað gevur fleiri uppgávur uttanlands. Tær flestu uppgávurnar uttanlands eru tengdar at VAR, og um vit ikki hava tað í Føroyum, so hevur tað við sær, at uppgávurnar uttanlands vera færri, siga teir.

Andrew Christiansen og Jógvan Breckmann siga at enda, at teir vilja viðmæla øllum, sum hava hug at døma, bæði kvinnum og monnum, um at bjóða seg fram, tí tað er altíð gott við nýggjum fólki og samstundis er tað gevandi fyri ein sum menniskja.

– Tað er einki at ivast í, at tú mennist nógv sum menniskja av at døma, og harafturat kemur tú at kenna nógv fólk kring alt landið, og tú knýtir nógv vinarbond, siga teir at enda.

***Minniligasti dysturin hjá Andrew:***

***Hjá Andrew Christiansen var minniligasti dystur, sum hann hevur verið við til at dømt, steypafinalan í 2016 millum KÍ og Víking.***

– Tað var ein heilt fantastiskur dystur. Eg minnist, hvussu tað var at koma inn á ein fullsettan Tórsvøll, og hvussu spenningurin var undir øllum dystinum, sum endaði við brotssparkskapping. Tað var ein serligur dystur. Uttanlands vil eg siga, at ein dystur millum Shamrock Rovers úr Írlandi móti norska Brann við Gilla Rólantsson á liðnum var ein minniligur dystur, hár írsku áskoðararnir runnu inn á vøllin, tá ið Shamrock skoraði, greiðir hann frá.

***Minniligasti dysturin hjá Jógvani:***

***Jógvan Breckmann skal ikki so langt aftur í tíðina fyri at finna minniligasti dystin, ið hann hevur verið við til at dømt.***

– Tað var grannauppgerðin í stríðnum um at sleppa undan niðurflyting í 2022 millum NSÍ og B68. Tað var ein fínur dystur, góðir karmar, við nógvum áskoðarum, og tað var nógv gjørt burturúr. Petur Reinert dømdi dystin, meðan Jørleif Djurhuus og eg sjálvur vóru hjálpardómarar. Í fyrireikingunum til dystin høvdu vit dømt ein avgerandi dyst hjá U17 dreingjum í Klaksvík dagin fyri. Tað var stuttligt, sigur Jógvan Breckmann.

Hann hevur eisini dømt uttanlands, og av teimum upplivingunum er serliga ein dystur í UEFA Youth League millum Chelsea og Malmø FF, sum Jógvan Breckmann minnist væl.



# GÓÐUR STEMNINGUR VESTURI Á EIÐINUM

*FC Suðuroy er eitt felag við fíggjarligum støðufesti, aktivum nevndarlimum og eldsálum, sum tryggja eitt grundarlag fyri einum spennandi ári, har fleiri profilar eru komnir aftur á gamlar gøtur*

Tað grør um gangandi fót vesturi á Eiðinum. Felagið hevur fótað sær og 2024 sær út til at blíva eitt spennandi ár. Bæði fyri FC Suðuroy, og samstarvið við TB og Royn í lægri deildunum og í Betri deildini hjá kvinnum.

Eyðbjørn Thomsen hevur verið nevndarlimur í FC Suðuroy síðani 2008, og hann er í dag ein bjartskygdur formaður í felagnum.

– Vit hava tað gott og stemningurin kring felagið er góður. Vit skylda ikki nøkrum nakað, men tað er hart arbeiði at heinta pengar. Vit hava ongar stórar stuðlar, men fleiri smærri og í flestu førum lokalar stuðlar, sigur Eyðbjørn Thomsen.



*Eyðbjørn Thomsen, FC Suðuroy-formaður*

Tað eru sjey fólk í nevndini og formaðurin heldur fyri, at tey eru øll virkin og gera eitt stórt arbeiði á hvør sínum øki.

– Eg vildi ynskt, at fleiri fólk sóu tað frívilliga arbeiði, sum verður lagt í eitt fótbóltsfelag, sigur Eyðbjørn Thomsen.

### TEY UNGU TAKA VIÐ

FC Suðuroy hevur lið í øllum ungdómsdeildnum. Hjá U15 og U17 dreingjum er talan um samstarv við TB og Royn. Eitt samstarv, sum riggar væl og gagnar øllum, verður sagt.

Tað hevur ávirkað venjingarmøguleikarnar, at dúkurin á Marghøllini skrædnaði í nógva vindinum í februrar í fjør. Hetta verður loyst í næstum.












Eisini í kvinnudeildini er samstarv millum FC Suðuroy, TB og Royn. Málið, við at hava liðið, er ikki so nógv úrslitini, men heldur samanhaldið.

– Vit ynskja at kvinnuliðið flytir seg, men tað má gerast við okkara egnu spælarum, og tað sær út til at fleiri gentur eru á veg. Vit hava stórar árgangir í U15 og U16, og vit hava eisini ungdómslandsliðsspælarar, sigur Eyðbjørn Thomsen, og leggur afturat, at dreymurin er at hesar ungu genturnar komandi árini vera at síggja á besta liðnum hjá suðuroyingum.

## MANSLIÐIÐ Í FRAMGONGD

Fremsta mansliðið hjá FC Suðuroy hevur fingið tilgongd av John Villy Leo, Salmundi Bech og Dánjali Godtfred. Teir eru allir uppaldir í felagnum, men hava í seinastuni roynt seg aðrastaði í landinum. Nú eru teir aftur og tað gevur góðan stemning vesturi á Eiðinum.

– Tað er jú upplagt, tá vit fluttu upp í 1. deild. Vit settu okkum í samband við allar tríggjar, men vit trúðu veruliga ikki at vit fingu allar. Tá tú kemur her at spæla, so spælir tú ikki fyri pengar, men longu í fyrstu samrøðuni fingu vit eina góða kenslu av at teir vilja hetta, sigur Eyðbjørn Thomsen, formaður í FC Suðuroy.



***"Málið er í fyrstu atløgu at yvirliva, tí tað er sjón fyri søgn, at tað er torført at flyta upp í 1. deild"***

Dánjal Godtfred var í fjør millum stinnu spælararnar hjá EB/Streymi í Betri Deildini, men arbeiði í Havn og lestur gera, at hann hevur leitað aftur til barndómsfelagið.

– Eg fegnist um at vera komin heim aftur. Eg havi altíð ynskt mær at koma suður aftur at spæla, og eg helt, at nú var rætta løtan komin. Daman og restin av familjuni búgva í Suðuroynni og soleiðis sleppi eg at síggja meiri til tey, sigur 27 ára gamli miðvallarin.

Av ringum royndum verður málið ikki sett ov høgt í hesum kappingarárinum. FC Suðuroy var í næstbestu deildini í 2021, men flutti niður aftur.

– Málið er í fyrstu atløgu at yvirliva, tí tað er sjón fyri søgn, at tað er torført at flyta upp í 1. deild. Vit høvdu eitt gott lið í 2021, men tað rakk ikki. Í fjør fluttu báðir uppflytararnir niður aftur, sigur formaðurin í felagnum.

Dánjal Godtfred vónar, at ein góð byrjan kann leggja lunnar undir eitt gott kappingarár.

– Vit fara inn til hvønn einasta dyst fyri at vinna. Koma vit nakað inn í kappingina og liggja væl fyri á stigatalvuni, so snýr tað seg um at fara eftir uppflytingini, sigur miðvallarin.

Tað verður aftur væl lýddi Pól Thorsteinsson, sum skal standa á odda fyri liðnum. Partarnir hava gjørt ein tvey ára sáttmála.

– Hann er ein seriøsur venjari, og tað er ein stór virðing fyri honum. Helst tí tað er ongin slingur í valsinum, tá Pól Thorsteinsson fer í holt við okkurt, og hann hevur eisini royndirnar sum spælari. Vit hava vant í uppstartinum, og tað eru fleiri enn tjúgu spælarar til hvørja venjing, sigur Eyðbjørn Thomsen at enda.

Talan er um lokalar spælarar og tríggjar útifrá. Ungu Jimmy Abdul og Emmanuel Andorful, og roynd Valerian Iobashvili.






Ungdóms-
landsliðini

# Fyrireika seg til stóru royndina





*Føroyar eru vertir fyri EM-endaspælinum hjá U17 gentum komandi ár. Tað merkir eisini árið í ár, har U17-landsliðið hevur fleiri spennandi dystir*







**Ungdómslandslið skrá 2024**

| | | |
|---|---|---|
| 11. - 20. mars | **U17 dreingir** | UEFA menningarkapping í Gibraltar |
| 15. - 23. mars | **U17 gentur** | EM-undankapping í Føroyum |
| 1. - 7. apríl | **U19 gentur** | EM-undankapping í Turkalandi |
| 6. - 11. mai | **U15 dreingir** | EfB NORSEA Elite Cup í Esbjerg |
| 12. - 20. mai | **U17 gentur** | UEFA menningarkapping í Moldova |
| 29. juni - 3. juli | **U17 gentur** | Baltic Cup í Estlandi |
| 19. - 23. august | **U15 gentur** | Baltic Cup í Estlandi |
| 11. - 16. septembur | **U17 gentur** | Baltic Cup í Estlandi |

Føroysku ungdómslandsliðini hava nógvar spennandi uppgávur í 2024. Men størsta uppgávan verður tá Føroyar í 2025 verða vertir fyri EM-endaspælinu hjá U17-gentum. Tað eru spælarar, føddar í 2008 og 2009. Hetta kann verða eitt gjøgnumbrot fyri gentufótbólt í Føroyum, tá tær bestu í Evropa í U17-árganginum koma til Føroyar at kappast.

Hetta verður ein óhugnaliga stórur fyri biti fyri føroyska U17-landsliðið, men samstundis ein fantastiskur sýnisgluggi fyri føroyskar gentur og dreingir at síggja bestu gentuspælararnar í Evropa spæla í Føroyum.

Hetta kann eisini verða ein spíri til at seta ferð á kjakið um spælaramenning í føroyskum ungdómsfótbólti.

– Vit hyggja altíð eftir, hvussu vit kunnu gera tað betri. Málið við eitt nú úrvalsvenjing er at tey bestu fáa tað bestu venjingina eina ferð um vikuna. Tað hava vit í U15, men kunnu vit gera tað við U16 eisini? Vit hyggja eisini eftir, hvar vit skulu seta inn og hvussu vit kunnu hjálpa feløgnum, sigur Pætur Smith Clementsen, tekniskur stóri í Fótbóltssambandi Føroya.

Hann gleðir seg til nógvar spennandi uppgávur í komandi landsliðsárinum.

– Vit eru komin væl áleiðis at fyrireika árið. Fleiri av uppgávunum er fastlagdar, men tað eru eisini aðrar uppgávur, har vit leita eftir røttu mótstøðu og hyggja eftir menningini av okkara egnu spælarum. Vit hava sett U16-landsliðini á stovn, og tað hevur riggað væl higartil, sigur Pætur Smith Clementsen.

**“Vit hyggja eisini eftir, hvar vit skulu seta inn og hvussu vit kunnu hjálpa feløgnum”**

Øll níggju ungdómslandsliðini skulu av landinum at royna seg í altjóða kapping.

## GENTULANDSLIÐINI

Fótbóltssamband Føroya hevur fýra gentulandslið. Talan er um U15, U16, U17 og U19, og hesi hava øll altjóða uppgávur í ár. U15 gentulandsliðið skulu spæla í Baltic Cup í august. Kappingin verður í Tallinn í Estlandi frá 19. til 23. august. Venjari er Sigtór Petersen.

Seinni á árinum verður ein UEFA menningarkapping, har tað vanliga eru fýra lond, sum møtast til eina kapping.

Eitt av nýggju ungdómslandsliðnum hjá FSF er U16-landsliðið. Eyðvør Jakobsen er venjari og tað verður arbeitt við tveimum venjingardystum seinni í ár.

## STÓRT ÁR FYRI U17

Fyri U17 landsliðið við gentum er talan um eitt spennandi ár. Fyrsta uppgávan er EM-undankapping, sum verður í Føroyum. Her er talan um U17-landsliði frá í fjør, sum eisini spælir hesa kappingina. Føroyar spæla móti Lettlandi, Rumenia og Georgia. Dystirnir verða spældir 17., 20. og 23. mars.

Eftir kappingina í mars tekur ein nýggjur árgangur við. Hetta er árgangurin, sum skal hýsa og luttaka í EM-endaspælinum í 2025.

Tær luttaka í Baltic Cup, har spælt verður móti Estlandi, Litava og Lettlandi. Kappingin verður frá 29. juni til 3. juli í Estlandi. Um heystið verður EM-undankapping og síðani kann føroyska liðið, við Eyðvør Jakobsen á odda, gera seinastu fyrireikingarnar til EM-endaspælið í Føroyum.

Hjá U19-landsliðnum yvirlappað árgangirnir, tí UEFA hevur gjørt nakrar broytingar. Liðið frá í fjør spælir fyrst eina kapping og síðani kemur ein nýggjur árgangur upp í, tá spælt verður til EM-undankappingina. Mótstøðuliðini eru Turkaland og Armenia. Arbeitt verður við venjingardystum fyri summarsteðgin, og í heyst verður ein EM-undankapping.

## JÓGVAN MARTIN LEGGUR LAG Á

Tað er royndi venjarin Jógavn Martin Olsen, sum stendur á odda fyri U15 og U16 landsliðnum við dreingjum. Soleiðis fáa yngstu landsliðini bestu byrjanina upp á yrkisleiðina sum ungdómslandsliðsspælarar.

U15 landsliðið luttekur í Esbjerg Cup. Tað verður í mei mánaði. Tað er ein kapping, sum passar væl til føroysku spælararnar, sum fáa sín elddóp í eini landsliðstroyggju. Talan er um góð donsk og onnur norðurlendsk lið, sum bæði kunnu verða betri enn okkara, men tað er eisini mótstøða, har okkarar spælarar eru omaná til tíðir. Hartil er lætt at ferðast til Esbjerg við at flúgva til Billund. Í novembur verður ein menningarkapping.

**“Vit leita eftir røttu mótstøðu og hyggja eftir menningini av okkara egnu spælarum”**

Jógvan Martin Olsen er eisini venjari hjá U16-landsliðnum, sum spælir tveir venjingardystir eftir summarsteðgin. Enn er ikki greitt, hvørjum tað verður spælt ímóti.

## U17 TIL GIBRALTAR

U17-landsliðið við dreingjum, sum Fróði Benjaminsen er venjari hjá, skal spæla í menningarkapping á Gibraltar. Mótstøðan er Litava, Ísland og Gibraltar.

Vanliga hevur U17-landsliðið spælt við í NM, men arbeitt verður við at finna meiri hóskandi mótstøðu.

U17-landsliðið hevur síðani tvær EM-undankappingar á skránni. Ein um heystið og eina í mars 2025.

Øssur Hansen er venjari hjá U19-landsliðnum, sum skal spæla EM-undankapping í heyst. Lutakastið hevur ikki verið enn, og harafturat verður eisini arbeitt við øðrum uppgávum til U19-dreingirnar.

U21-landsliðið er mitt í eini EM-undankapping. Føroyar hava vunnið sær sjey stig við tveimum sigrum á Andorra og Hvítarusslandi, og einum javnleiki í Klaksvík móti Andorra. Í ár eru millum annað tvær uppgerðir móti sterka og evnaríka U21-landsliðnum hjá Portugal, umframt ein túrur til Koratia. Helst eru bestu møguleikarnir fyri stigum í Klaksvík, har Grikkaland og Hvítarussland koma á vitjan.

Klumma

# Fótbóltur um alt landið

## *Hvussu skal kappingin í bestu fótbóltsdeildini skipast?*



***Emil Lisberg Jacobsen***

Tað er eitt sindur sum við kjakinum um vit skulu hava eitt ella sjey valdømi. Allar skipanir hava fyrimunir og vansar, men tað er eisini sunt, at kjakið tekur seg upp, soleiðis sum tað ger við jøvnum millumbilum. Tað seinasta er, at Fótbóltssamband Føroya hevur lagt upp til at broyta kappingina til eitt grundspæl og eitt endaspæl, sum vit kenna tað úr Danmark til dømis. Eitt áhugavert uppskot, sum – eins og øll onnur – hevur sínar fyrimunir og sínar vansar.

Onnur uppskot hava verið uppi og vent, til dømis at minka kappingina aftur niður í átta lið, sum hon var árini 1979-1987. Men tað virkar eitt sindur sum at ganga skeivan veg at bakka aftur og minka deildina, eftir at hon nú hevur talt 10 lið í meir enn 30 ár. Fótbólturin í dag er so nógv broyttur, og liðini hava brúk fyri fleiri dystum enn teir 14 landskappingardystirnir, sum vóru í 1987. Tí hevði ein kapping við átta liðum í dag ivaleyst verið 28 umfør í staðin fyri tey 14, sum vóru tá. Í sjálvum sær er tað betri enn verandi skipan við 27 dystum, sum hevur tann heilt øgiliga keðiliga veikleikan, at summi lið fáa fleiri heimadystir enn onnur.

Men høvuðsgrundin til ikki at fara aftur til átta lið hevur eftir mínum tykki ikki so nógv at gera við, hvussu *nógvir* dystir verða, men meira *hvørjir* dystir verða. Eitt av fremstu endamálunum – um ikki sjálvt høvuðsendamálið – hjá FSF má vera at breiða fótbóltin so langt út um landið sum tilber, og tað verður ikki gjørt við at minka deildina niður í átta lið.

Um vit hyggja eftir fótbóltskortinum í dag, so er fótbólturin ógvuliga miðsavnaður til høvuðsstaðin, Eysturoynna og Klaksvík. Tann miðsavnanin hevði ikki blivið minni í eini kapping við átta liðum.

Í eini kapping við átta liðum verður minni pláss fyri TB, fyri ikki at tala um B71 og FC Suðuroy, og um 07 Vestur, sum hevur tikið seg nógv fram seinastu árini, kemur inn í eina ringa gongd og dettur úr bestu deildini, kann tað eisini gerast trupult hjá teimum at flyta upp aftur í kapping við serliga eysturoyarliðini. Og so enda vit við eini kapping millum Havnina,

Klaksvík og Eysturoynna, meðan Vágar, Sandoy og Suðuroy fara at kappast í næstbestu deildini. Og fyri at siga sum tað er: Tað hevði ikki verið serliga stuttligt.

Í 1978 bleiv steypafinalan millum HB og TB spæld á Sandi, og fleiri av teimum, sum í 1989 blivu føroyameistarar við B71, hava nevnt, hvussu stórt og forkunnugt tað var tá í 1978 at síggja stjørnurnar hjá HB og TB spæla har, og at tann dysturin var ein partur av íblástrinum hjá tá unga fótbóltsfelagnum í Sandoynni. Sjálvandi eru samfelag og umstøður nógv broytt síðan 1978, og í dag síggja tey ungu sínar stjørnur í sjónvarpi á stórum útlendskum leikvøllum og ikki á føroyskum grúsi. Íblásturin hjá teimum ungu í dag kemur ikki frá Henriki Thomsen ella Hera Nolsøe, men frá Mohammed Salah og Kevin De Bruyne, men í øllum hesum romantikkinum má tað eisini liggja ein áminning um, at tað hevur týdning at fáa øll við og at geva øllum betri møguleikar fyri at sleppa upp í part.

So kann onkur siga, at færri lið í bestu deildini hevði trýst smærru feløgini til at gerast betri fyri at fáa ein part av Betrideildarkøkuni. Men køkan verður minni, og tað verða færri pláss rundan um borðið til at sleppa framat køkuni, so tað gevur fleiri taparar enn vinnarar.

Gjógvin millum topp og botn hevði ivaleyst eisini blivið størri, tí í eini kapping við átta liðum hevði "topp 4" framvegis sitið tungt á evropeisku plássunum. Avgerðin um, hvør endar í topp 4, fellur ikki í innanhýsis dystum millum topp 4-liðini, men í, hvat av topp 4-liðunum kann missa nóg nógv stig móti lægru liðunum til at detta út úr topp 4. Og tá tað bara verða fýra onnur lið at missa stig ímóti heldur enn seks, sigur tað seg sjálvt, at útlitini fyri broytingum í topp 4 verða verri.

Í so máta er munurin millum liðini í ovara og niðara enda av kappingini við 10 liðum heldur ikki altíð so stórur. Gaman í fáa vit dystir, har vinnarin mestsum er givin frammanundan, og har veikara liðið beinleiðis fer at spara spælarar, ella teir "fáa sær leikbann" til dyst móti toppliðunum, men tað síggja vit allastaðni. Tá Barcelona var uppá tað besta fyri 10-15 árum síðan var tað mestsum vanligt, at veikastu liðini í La Liga spardu sínar bestu spælarar, tí tey høvdu uppgivið dystin frammanundan.

Men vit hava eisini fesk dømi um, at alt ikki er givið frammanundan. EB/Streymur trýsti B36 til tað seinasta í 2022 um fjórða evropeiska plássið, og sama árið sóu vit púra óvæntað NSÍ flyta niður. Harumframt hava vit steypakappingina, sum kann loypa split í etableraðu evropeisku luttøkuna hjá topp 4-liðunum. Tað mundi hent í fjør. So samanumtikið er ein kapping við tíggju liðum í sjálvum sær ikki nøkur forðing fyri menning.

Tað er gott og sunt at endurskoða kappingarleistin við jøvnum millumbilum, og møguliga er tað eisini komið hartil, at tað er neyðugt við nýskipan í kappingini, sum hevur verið óbroytt síðan 2005. Men um fótbóltur á hægsta stigi skal røkka so langt út um landið sum tilber, sigur tað seg sjálvt, at tað ikki verður gjørt við at lække talið av liðum í bestu deildini. Tá er ein skipan við grund- og endaspæli nógv skilabetri.



# LANDSLIÐS BÚÐIN

**Á TÓRSVØLLI**

**OPIÐ ER:**
MÁNADAG TIL LEYGARDAG FRÁ KL. 11.00 TIL 17.00

Vitja nethandilin her

**fsf.fo**




